

# VINNUSJÓNARMIÐ 2002

## – EITT ÍKAST TIL KJAK UM VINNU- OG SAMFELAGSKARMAR

# Vinnusjónarmið 2002

*– eitt íkast til kjak um vinnu- og samfelagskarmar*

Føroya Arbeiðsgevarafelag

oktober 2002

Útgevari: Føroya Arbeiðsgevarafelag
Design/umbróting: Vasti sp/f • Filmútkoyring: Repro-Z • Prent: Estra

## Innihaldsyvirlit

1 Inngangur ... 6
2 Samfelagsbúskapur og stýring ... 7
3 Vinnukarmar ... 9
4 Arbeiðsmarknaðurin ... 18
5 Vinnan, útbúgvingarøkið og gransking ... 25
6 Skattaskipanin ... 37
7 Almenni sektorurin ... 42
8 Nøkur tilmæli um lógarbroytingar/-endurskoðan... 52
9 Føroyar og umheimurin ... 56
10 Vinnusjónarmið í stuttum ... 58

# 1 Inngangur

Í hesum riti leggur Føroya Arbeiðsgevarafelag fram síni sjónarmið um ymisk øki, sum beinleiðis ella óbeinleiðis ávirka karmarnar hjá vinnuni. Viðgerðin og uppskotini í ritinum fevna víða. Nortið verður tó ikki við øll viðurskifti, sum eru vinnuni viðkomandi.

Í summum førum verða yvirskipaðar meginreglur umrøddar. Í øðrum førum er talan um ítøkiligar ávísingar. Føroya Arbeiðsgevarafelag vil fegið frætta aftur frá øllum pørtum, sum hava áhuga fyri kørmunum hjá vinnuni og hennara korum annars.

Nevndin í Føroya Arbeiðsgevarafelag vónar, at hetta ritið kann geva íblástur og onkur hugskot. Høvuðsendamálið við ritinum er at birta upp undir eitt mennandi kjak, sum skal gagna vinnuni og samfelagnum sum heild.

**1.1 Evnir í hesum bóklingi**
Viðmerkingar og sjónarmið okkara eru bólkað í nakrar høvuðspartar. Evnini eru stutt lýst niðanfyri.

- *Samfelagsbúskapur og stýring:* Tankar um, hvussu vit tryggja skynsamt eftirlit við samfelagsbúskapinum, og hvussu búskaparfrágreiðingar eiga at verða lagdar fram alment, so skapast kann eitt uppbyggjandi kjak um samfelagsviðurskiftini.

- *Vinnukarmar:* Viðgerð av vinnukørmum og vinnupolitikki, sum bæði fevnir breitt og snýr seg um serstøk viðurskifti. Dentur verður lagdur á, at politikarar framvegis ikki skulu leggja seg út í viðurskiftini hjá vinnuni, og at vinnan skal vera stuðulsfrí og kappingarfør mótvegis umheiminum.

- *Arbeiðsmarknaðurin:* Sjónarmið um ymsar skipanir á arbeiðsmarknaðinum, sum Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur skulu eftirkannast. Ymsar forðingar fyri atgongd til arbeiðsmarknaðin verða eisini umrøddar.

- *Vinnan, útbúgvingarøkið og gransking:* Góðar útbúgvingar og økt gransking eru hornasteinar undir økta vitanartørvinum hjá vinnuni. Útbúgvingarøkið og granskingin verða her løgd undir sjóneykuna. Hugt verður at, hvussu verandi skipanir kunnu mennast.

- *Skattaskipanin:* Skatta- og avgjaldsskipanirnar ávirka í stóran mun kostnaðarstøðið hjá vinnuni. Millum viðgjørdu evnini í hesum partinum eru høgi persónsskatturin og ymsar avgjaldsskipanir.

- *Almenni sektorurin:* Almenni sektorurin ávirkar vinnuna óbeinleiðis umvegis til dømis skattatrýstið. Lagdir verða fram tankar um, hvussu almenni bygnaðurin kann gerast liðiligari og effektivari.

- *Endurskoðan av lógum:* Nøkur ítøkilig tilmæli um, hvussu lógararbeiðið kann gerast betri, og hvørjar lógarbroytingar eiga at verða framdar á vinnuøkinum.

- *Føroyar og umheimurin:* Viðurskifti okkara við umheimin verða viðgjørd, serliga tilknýtið til ES.

Í síðsta parti er yvirlit yvir tey sjónarmið, sum Føroya Arbeiðsgevarafelag setir fram í hesum bóklingi.

# 2 Samfelagsbúskapur og stýring

Tankar um, hvussu vit tryggja skynsamt eftirlit við samfelagsbúskapinum, og hvussu búskaparfrágreiðingar eiga at verða lagdar fram alment, so skapast kann eitt uppbyggjandi kjak um samfelagsviðurskiftini.

**2.1 Óheft útlendskt búskapareftirlit**
Fakliga grundarlagið undir føroyskari búskaparstýring er sett saman av trimum pørtum: 1) hagtalsskipanir, 2) greiningarvirksemi og 3) kunngerð av hagtølum og greiningum. Allir partar hava týdning, men tað er í sambandi við greiningarvirksemið, at niðurstøðurnar um búskaparstøðuna verða gjørdar.

Greiningarvirksemið hjá føroyskum stovnum sum Búskaparráðnum, Landsbankanum, Fíggjarmálaráðnum og stóru peningastovnunum hevur ment seg seinastu árini, men ongin reglulig faklig greining av føroyska búskapinum verður gjørd uttanlands. Ov langt hevur verið millum *ad hoc* greiningarnar. Tann seinasta var Caragata-frágreiðingin frá 1999. Aðrar frágreiðingar av hesum slag vóru tann hjá IMF og Gørtz-frágreiðingin. Nyttan í hesum frágreiðingum er, at fremmand eygu skoða okkara búskap og samfelag, seta spurningar og vísa á loysnir, sum mangan eru øðrvísi enn okkara egnu.

Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur tað vera sera týdningarmikið, at Føroyar eins og onnur lond fáa altjóða stovnar at meta um búskapin. Til dømis kundu OECD ella altjóða viðurkendir stovnar sum Moodys og Standard & Poor gjørt hetta arbeiðið. Týdningarmikil viðurskifti, ið kundu verið lýst, eru:

- Kredittvirðið hjá almenna sektorinum og búskapinum sum heild
- Mannagongdir í politisku skipanini, sum settar verða í verk, um búskapurin er fyri afturstigi
- Metingar av búskaparpolitikkinum

**2.2 Samfelagskjak – betri samskifti, so nakað kemur burturúr**

Hagtøl og metingar av búskapinum eru grundarlagið undir samfelagskjakinum. Fyri at fáa eitt so gott samfelagskjak sum gjørligt er neyðugt, at samskifti er millum allar partar, so allar metingar og meiningar koma fram, og almenna vitanarstøðið hækkar. Partar eru eitt nú politikarar, embætisfólk, vinnan, fjølmiðlar og relevantir stovnar.

Serliga Búskaparráðið skal samskipa hetta samskiftið. Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur ikki, at Búskaparráðið í sínum síðstu frágreiðingum hevur megnað hesa uppgávu nóg væl. Frágreiðingarnar eru ov teoretiskar og taka í alt ov lítlan mun hædd fyri, hvussu veruleikin sær út. Hetta kemst møguliga av, at Búskaparráðið tosar ov lítið við relevantu partarnar í samfelagslívinum. Til dømis hevur nærum einki samskifti verið millum Búskaparráðið og feløgini í Vinnuhúsinum.

Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur tað hava alstóran týdning, at Búskaparráðið metir um gongdina og bygnaðin í búskapinum, men verða frágreiðingarnar ov teoretiskar, skilja móttakararnir ikki boðskapin. Hetta er støðan í dag, og hon er óheppin, tí skal Føroya fólk lurta, krevst virðing fyri Búskaparráðnum.

Føroya Arbeiðsgevarafelag ivast eisini í, um Búskaparráðið skal koma við ítøkiligum uppskotum um, hvussu tilráðingar hjá ráðnum skulu fremjast í verki. Her verður millum annað hugsað um fiskidagaskipanina, sum Búskaparráðið skeyt upp. Ein uppgáva hjá ráðnum er at birta upp undir kjak, eisini um eitt so trupult mál sum at krevja tilfeingisrentu fyri fiskiskapin undir Føroyum. Men høvuðsuppgávan er at leggja lunnar undir kjakið við lættfatiligum greiningum, eins og ráðið gjørdi í sambandi við eftirlønarspurningin. Tá eitt felags vitanarstøði er fingið til vega, og ikki fyrr enn tá, eru allir partar til reiðar at viðgera ítøkiligar loysnir. Uppskotið hjá Búskaparráðnum um fiskidagaauktión kundi ikki vinna frama, tí uppskotið datt sum ein liðug loysn úr leysari luft, áðrenn nøkur felags fatan var fingin fyri málinum.

# 3 Vinnukarmar

Viðgerð av vinnukørmum og vinnupolitikki, sum bæði fevnir breitt og snýr seg um serstøk viðurskifti. Dentur verður lagdur á, at politikarar framvegis ikki skulu leggja seg út í viðurskiftini hjá vinnuni, og at vinnan skal vera stuðulsfrí og kappingarfør mótvegis umheiminum.

**3.1 Javna kapping – ikki protektionismu**

Í seinastuni hevur aftur tikið seg upp kjak um at verja føroyska vinnu ímóti útlendskari kapping og útlendskum kapitali. Eitt nú hevur verið upp á tal at forða Elektron í at samstarva við Pengeinstitutternes Betalingsservice um eina nýggja gjaldsskipan. Neyðugt er at sláa púra fast, at Føroya Arbeiðsgevarafelag vil ikki hava vinnuna lagda í kuvøsu. Kapping er altíð góð, bara vit tryggja okkum, at hon er á jøvnum føti.

Vanliga er semja um, at verja av vinnu ímóti kapping uttanífrá er skaðilig í longdini. Tann vardi parturin trýstir tann kappingarføra partin, og prísurin fyri veitingarnar hækkar. Í ávísum førum kann vera rætt at verja eina vinnu við lóg í avmarkað tíðarskeið ímóti útlendskum kappingarneytum. Grundgevingar fyri verjulógum kunnu vera at geva eini vinnu stundir at menna seg, áðrenn hon fer í altjóða kapping, ella at forða útlendingum í at keypa rættindi til náttúrutilfeingið. Hesi undantøk frá meginregluni eru í lagi.

Tá aðrar tjóðir hava verjutiltøk mótvegis okkara vinnu, er heldur ikki rætt at lata dyrnar á okkara lítla marknaði standa víðopnar. Kappingin mótvegis umheiminum má vera jøvn.

Sum meginreglu vil Føroya Arbeiðsgevarafelag tó ikki skerja kappingina ella seta upp verjumúrar um føroyska vinnulívið. Felagið hevur tvørturímóti síðan seinna helming av áttatiárunum arbeitt miðvíst fyri, at vinnan skuldi gerast stuðulsfrí og kappingarfør mótvegis umheiminum, og at Føroyar skuldu gerast eitt áhugavert land at gera íløgur í. Lat okkum lýsa gongdina við nøkrum dømun:

1. *Fríhandilssáttmáli við ES:* Tollverjan av heimaídnaðinum er tikin burtur, tí tað varð hildið at vera ótíðarhóskandi at verja seg, og tí neyðugt var at keypa útflutningsvinnuni marknaðaratgongd.
2. *Kappingarføri:* Hugtakið kappingarføri vann hevd. Hildið varð, at nú skuldu vit kappast á jøvnum føti við útlendingar. Vinnan kravdi javnbjóðis karmar og ikki hjálp og stuðul.
3. *Kreppan og fylgjurnar:* Kreppan hevði við sær, at menn fóru at hugsa øðrvísi. Kannað varð, hvussu vinnan kundi fóta sær aftur. Nógv álit vórðu skrivað, sum vinnan var við til at orða. Ein reyður tráður í álitunum var, at stuðulin skuldi burtur, og at vinnan skuldi standa á egnum beinum. Eisini varð fitt gjørt burturúr at fáa íløgur higar.
4. *ES-álitini:* Tvey álit vórðu skrivað um viðurskifti okkara við ES. Bláa álitið kom í 1995 og Reyða álitið í 1998. Í hesum álitunum varð dentur lagdur á týdningin av innara marknaðinum í ES, sum millum annað hevur havt við sær frían flutning av kapitali og arbeiðsmegi.
5. *Vinnupolitikkurin:* Vinnupolitikkurin hjá Vinnumálaráðnum varð útgivin í 1999. Vinnan var við til at orða vinnupolitikkin og tók undir við niðurstøðunum, sum júst søgdu, at vinnan skal vera stuðulsfrí og kappingarfør mótvegis umheiminum, og at forðingar ikki skulu leggjast í vegin fyri útlendskum kapitali.
6. *Átak fyri útlendskum íløgum í Føroyum:* Arbeiðsgevarafelagið skipaði saman við tí almenna fyri einum átaki, sum skuldi fáa útlendingar at gera íløgur her á landi. Kanningar vórðu gjørdar, og Føroyar vórðu royndarmarknaðarførdar sum áhugavert íløguøki.
7. *Arbeiðsgevarafelagið og Vinnuhúsið:* Í útmeldingum sínum á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum hevur Føroya Arbeiðsgevarafelag miðvíst hildið seg til tær meginreglur, sum eru orðaðar í vinnupolitikkinum, við tí endamáli at skapa eitt sunt vinnulív og sleppa undan óneyðugari politiskari uppílegging. Lyklaorðið hevur verið stabilitetur.

Kósin varð sett fyri meira enn 10 árum síðani og hevur sostatt verið fylgd. Arbeiðsgevarafelagið ætlar ikki at broyta kós, tá um protektionismu ræður. Onki gagn er í at verja føroyska vinnu mótvegis útlendskari kapping og útlendskum kapitali, um so talan er um KT-vinnuna ella flakavinnuna.

Skal føroysk KT-vinna menna seg og standa seg á altjóða marknaðinum, er neyðugt, at vit eru opin fyri umheiminum, taka lut í altjóða samstarvi og gagnnýta útlendskar íløgur. Annars verða vit eftirbátur, og føroysk KT-vinna verður verandi ein vinna fyri heimamarknaðin. Orka skal leggjast í nýskapan heldur enn menning av skipanum, sum útlendingar longu hava skapt, eisini í eldri vinnum sum til dømis flakavinnuni.

Ein ávís ræðsla er fyri útlendskum íløgum. Skal rætturin at reka til dømis fiskavirkir avmarkast, skal rætturin at reka aðra vinnu ivaleyst eisini avmarkast. Fiskaframleiða er jú í meginregluni ein frí vinna, sum ikki er tengd at loyvum ella kvotum. Um útlendski kapitalurin í mesta lagi kundi verið til dømis 30 prosent, hevði neyvan verið møguligt at bjargað Smyril Line, har útlendski kapitalurin er um 40 prosent, ella at stovnað Kall, har hann er um 50 prosent.

Føroyingar eiga dóttirfeløg uttanlands í fiskivinnuni. Men spurningurin er, um vit sleppa at hava feløg í til dømis Onglandi, Fraklandi og Danmark, ið fult og heilt eru føroysk, um vit avmarka, hvussu nógv útlendingar skulu eiga hjá okkum. At biðja um verju ímóti kapping og útlendskum kapitali er at venda aftur til eina gamla synd, sum brýtur niður tað, ið bygt hevur verið upp seinnu árini. Stabiliteturin hvørvur, og latið verður upp fyri politiskari uppílegging.

Føroyingar eiga ikki at vera blindir fyri teimum møguleikum, sum útlendskar íløgur kunnu skapa. Gera útlendingar íløgur í Føroyum, má tað koma av, at føroyska vinnan er áhugaverd og kappingarfør. Haraftrat fær føroyska samfelagið gagn av royndunum og hugsunarhættunum hjá útlendingunum.

### 3.2 Støðumeting av vinnupolitikkinum

Í 1998 tók Vinnumálaráðið stig til at orða ein vinnupolitik, sum løgtingið hevði aðalorðaskifti um í 1999. Allir flokkar á tingi tóku undir við meginreglunum í vinnupolitikkinum. Føroya Arbeiðsgevarafelag fegnaðist tá um, at vinnupolitikkurin var vorðin skjalfestur, og at hann gav vinnuni tryggar og støðugar karmar undir marknaðarbúskaparligum treytum at virka undir.

Vinnupolitikkurin hevur eftir okkara tykki víst seg at vera eitt gott amboð, tá einstøk mál taka seg upp, bæði fyri vinnuna og politisku skipanina. Hann virkar sum ein viti. Rætta kósin kann haldast, sjálvt tá flúrar og sker eru í nánd.

Nøkur ár eru liðin, síðan vinnupolitikkurin varð viðgjørdur á tingi, og Føroya Arbeiðsgevarafelag mælir tí til, at ein støðumeting verður gjørd. Hesi viðurskifti eiga eftir okkara tykki at verða viðgjørd:

> *Landsins vinnupolitikkur:* Vinnupolitikkurin er orðaður í Vinnumálaráðnum sum meginregla fyri júst hetta ráðið, men eisini Fiskimálaráðið og Oljumálaráðið hava vinnumál um hendi. Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur tað vera týdningarmikið at fáa staðfest, at orðaði vinnupolitikkurin umfatar alt landsstýrið.
>
> *Tillaging av skipanum:* Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur fyrr víst á, at enn finnast skipanir, ið ikki samsvara við umrødda vinnupolitikkin. Málið má vera, at hesar skipanir verða avtiknar, men neyðugt er at leggja eina tillagingarætlan, áðrenn nakað verður gjørt, so karmarnir hjá vinnuni verða støðugir.
>
> Talan er um fleiri ymiskar skipanir. Nakrar samsvara við vinnupolitikkin, tí talan er um stuðul til gransking, marknaðarføring og annað. Aðrar bera brá av sosialum skipanum, meðan uppaftur aðrar eru skipanir, sum skulu tryggja arbeiðspláss í útjaðaranum. Eisini finnast lógarásetingar, sum forða vinnuni í at virka frítt. Arbeiðsgevarafelagið heldur, at allar tílíkar forðingar skulu avtakast. Tær samsvara ikki við vinnupolitikkin og darva vinnuligu menningini.

### 3.3 Politisk stýring av vinnulívinum

Í ársfrágreiðingini hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag frá 2000 vísti felagið á, at besti hátturin at fáa eitt sterkt vinnulív er at:

- lata marknaðarkreftirnar ráða
- avtaka allan rakstrarstuðul
- vísa størsta varsemi, tá vinnuframaskipanir, sum hava onkran stuðul við sær, verða gjørdar
- leggja dent á vinnuframaskipanir, sum vinnuni tørvar, og sum stimbra nýggja menning, nýggja framleiðslu, øktan útflutning ella øktan førleika
- hava góðar og tryggar vinnukarmar, herundir støðuga lóggávu

At veita vinnuni stuðul er tað sama sum at leggja seg út í fría marknaðin. Tað er ein roynd hjá politikarunum at stýra vinnuni. Kreppan vísti, at best er at lata marknaðarkreftirnar ráða. Hetta eiga politikararnir at leggja sær í geyma.

### 3.4 Fiskivinnan

*3.4.1 Flakavinnan og bindingar í fiskivinnuni*

Fiskiloyvi eru søgulig rættindi, men eru samstundis serrættindi, sum bert ein ávísur partur av vinnuni fær. Samstundis verða nakrar bindingar lagdar á skip-

ini um, hvussu tey kunnu selja. Hetta eru almennar bindingar av vinnuni, men talan er um bindingar, sum eru knýttar at serrættindunum.

Fiskivinna er sum heild ein vard vinna í londunum kring okkum. Ísland, Norra og ES hava hvørt í sínum lag bindingar, tollreglur og upprunareglur, sum gera tað ómøguligt at hava lønandi rakstur við útlendskari ráværu á einum føroyskum fiskavirki. Fiskivinnan á landi er tí avmarkað til bert at hava føroysk skip sum ráværuveitarar.

Nógvur fiskur fer heilur og óvirkaður av landinum. Um hetta fer fram í fríari kapping á jøvnum føti, er ikki so nógv at siga til tað. Men tá serrættindi bæði í Føroyum og í grannalondunum geva útlendskum fiskakeyparum fyrimun í kappingini um føroyska fiskin, er tað ikki í lagi.

Í ES skal allur heilur feskur fiskur, sum verður avreiddur ella seldur, skiljast eftir góðsku og stødd áðrenn fyrstu sølu. Henda binding er ikki galdandi í Føroyum. Hetta ger, at ES-virkir, sum eru kappingarneytar hjá føroysku virkjunum, hava greiðan kappingarfyrimun til at keypa føroyskan fisk.

Føroysk virkir eiga at fáa sama keypsfyrimun til føroyskan fisk, sum útlendsk virkir hava. Hetta kundi havt við sær, at onkrar av hinum bindingunum um sølu av ráfiski ikki vóru so neyðugar longur.

**3.4.2 Rakstrarstuðul til flutning av fiski**

Í ritinum Fiskivinnupolitikkur, sum var til aðalorðaskifti í tinginum várið 2001, verður nevnt, at tað er skeivt at veita vinnuni beinleiðis stuðul av ymiskum slag. Dentur verður lagdur á, at stuðul heldur skal veitast til gransking og menning, sum kunnu styrkja vinnuna í longdini og bøta um kappingarførið.

Eisini verður nevnt, at flutningsstuðul er latin fyri at javnseta allar fiskakeyparar kring landið og økja kappingina, so hon skal geva best møguliga úrslitið fyri samfelagið. Hetta ljóðar gott, men spurningurin er, hvussu stuðulin roynist í verki. Í kunngerðini um stuðul til flutning av fiski sæst, at talan nú er um fimm ymiskar stuðulsskipanir:

1. Stuðul til flutning av ráfiski frá landing til virkir
2. Stuðul til flutning av feskum fløkum frá virkjum til avskipingarhavn
3. Stuðul til flutning av ryggjum og høvdum frá virkjum til virkir
4. Stuðul til flutning av ráfiski frá útróðrarmanni til uppboðssølu
5. Stuðul til flutning av frystum fiski frá goymslu til virki

Felags fyri hesar skipanir er, at stuðulin verður roknaður í kilo og latin til rakstur av vinnuni. Talan er sostatt um beinleiðis rakstrarstuðul. Tá flutningsstuðulin kom á fyrsta sinni, var bert talan um tvær stuðulsskipanir. Sostatt eru stuðulsskipanirnar farnar at hópa seg upp.

Eftir kunngerðini verða ávís vinnuøki vald út at fáa flutningsstuðul. Samstundis verða onnur øki hjá kappingarneytum vald frá sum stuðulsøki. Mismunur verður gjørdur á ísaðum, frystum og saltaðum fiski, og um fiskurin er avreiddur her ella har. Ógvuliga trupult er at síggja, hvussu stuðulsøkini verða vald út.

Í orðaða fiskivinnupolitikkinum verður sagt, at flutningsstuðulin skal javnseta teir, sum kappast, men sum kunngerðin virkar í dag, er hon júst kappingaravlagandi. Roknidømi vísa, at avlagingin í mun til plasering, slag av framleiðslu, eigaraviðurskifti og galdandi flutningsprísir er 40 oyru fyri hvørt kilo av ráfiski í ringasta føri. Fleiri dømi eru um, at stuðulsskipanin ikki hjálpir ymsu økjunum at fáa fisk, soleiðis sum ætlanin annars var, men tvørturímóti ger, at fiskur verður fluttur inn á meginøkið til virkningar.

Arbeiðsgevarafelagið mælir til, at hugt verður nærri at hesum viðurskiftum, og at róð verður aftur á beint.

**3.5 Fíggjarligt undirstøðukervi**

Einfalt sagt er fíggjarliga undirstøðukervið tann skipan í samfelagnum, sum tryggjar, at eftirspurningurin eftir fíggjarligum tænastum verður nøktaður.

Fyri fáum árum síðani vóru tað bara bankarnir, sparikassarnir, tryggingarfeløgini og so almennir grunnar og nakrar veðhaldsskipanir, ið veittu fíggjarligar

tænastur. Serliga tað almenna átók sær váða. Útboðið av váðafúsum eginkapitali var avmarkað.

Í seinastuni hevur fíggjarliga undirstøðukervið tó ment seg. Íløgubankavirksemi er vorðið vanligt, og eisini finnast fleiri útbjóðarar av eginkapitali. Somuleiðis er vorðið alt meira vanligt, at feløg eru hóskandi kapitaliserað, tá tey fara undir nýtt virksemi, serliga tá fleri íleggjarar eru saman um verkætlanir. Fíggjarskipanirnar eru fyri ein stóran part kjølfestar í marknaðarbúskaparligum meginreglum. Sera umráðandi er eisini, at skipanirnar virka á vinnuligum grundarlag, so tær altíð verða lagaðar til tann tørv, sum einaferð er.

Enn er tó ikki komið á mál. Føroyski virðisbrævamarknaðurin er ikki fingin at virka, men er á veg. Ikki fyrr enn virðisbrævamarknaðurin er farin í gongd, verður siðvenjan ment, sum skal seta ferð á hann, og tí hevur tað skund at fáa hann at virka. Miðast skal eftir at fáa hann at virka á sunnum búskaparligum grundarlag.

Heldur ikki hava vit nakra fíggjarliga skipan fyri íverksetarar, tað vil siga verkætlanir, ið ikki eru komnar so væl áleiðis í menningini, men vísa góðar møguleikar fyri menning. Vinnumálaráðið stovnaði herfyri Klekingardepilin, sum skal hýsa íverksetarum í eini menningartíð. Tílíkir deplar eru fingnir at virka aðrastaðni, men ein fortreyt er, at váðafúsur kapitalur finst. Henda fortreyt vantar hjá okkum.

Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur, at ein máti at skapa hesa fortreyt kundi verið, at partar av vinnuni funnu saman um eina verkætlan og soleiðis fingu til vega kapitalin, ið skal seta virksemið í gongd. Eisini hevði verið ynskiligt, um fíggjarliga sterk virkir vóru við til at stovna ein sáðkapitalgrunn, ið kundi verið við til at lagt fíggjarliga støðið undir verkætlanir á byrjunarstøði.

Myndin niðanfyri vísir gongdina hjá einum felag, tá tað byrjar, til tað er vorðið so stórt, at tað kann verða skrásett á einum marknaði ella gerast partur av einum størri uppkeypi ella samanlegging.

**Kapitaltilføring**




### 3.6 Oljan og vinnan

Løgtingið avgjørdi undir viðgerðini av løgtingslógini um kolvetnisvirksemi, at allur flutningur av útgerð og fólki úr og í føroyskt øki skal fara um føroyskan bryggjukant ella føroyskan flogvøll.

Oljuvinnan hevur orsakað av ásetingini um føroyska bryggjukantin havt Føroyar sum útgangsstøði. Hetta hevur givið føroyskari vinnu møguleikar at sleppa upp í part og ment okkara vitan, førleika og royndir innan oljuvinnu munandi. Var kravið um bryggjukantin ikki í lógini, kundi hent, at oljufeløgini virkaðu úr Skotlandi ella Hetlandi í staðin. Føroyingar høvdu tá havt færri møguleikar at kunnað seg við oljuvinnuna og ment álitið millum oljuídnaðin og føroyskt vinnulív.

Fyri at læra oljuvinnuna at kenna er eisini neyðugt at kenna arbeiðið á gólvinum. Kunnleikin til vinnuna, sum fæst til vega bæði á gólvinum og í framkomnum størvum, ger okkum før fyri at stýra virkseminum.

#### 3.6.1 Førleikamenning og oljupengar

Vinnumenning í Føroyum hevur fingið nýggjar møguleikar í sambandi við oljuleitingina. Oljufeløgini hava bundið seg til at brúka 85 milliónir krónur til førleikamenning komandi 5-6 árini. Peningurin skal brúkast til ymisk økir, eitt nú gransking, útbúgving og beinleiðis hjálp til fyritøkur í sambandi við førleikamenning og marknaðaratgongd.

Oljufeløgini umsita pengarnar hvørt í sínum lag. Oljumálaráðið skal tó geva neyðuga loyvið, um pengar til eina verkætlan skulu av førleikakontuni. Oljumálaráðið hevur við vilja lagt umsitingina til oljufeløgini, so tey kunnu fáa ein virknan leiklut í samfelagnum.

Vansin við hesi skipan er tó, at tað er torført at gera sær eina greiða mynd av, hvat peningurin verður brúktur til. Vandi er fyri, at vinnumenningin ikki verður í samsvari við tað, sum føroyingar í veruleikanum ynskja.

Tørvur er á eini ávísari samskipan á hesum øki, sum tó ikki skal hava við sær, at tann virkni og málsøkjandi parturin av vinnumenningini hvørvur. Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur, at føroyska vinnan í størri mun eigur at verða tikin við upp á ráð í sambandi við førleikamenning, og at Oljumálaráðið eigur at taka stig til tættari samstarv við vinnuna um, hvussu peningurin til førleikamenning skal brúkast.

Verður olja ikki funnin í rakstrarverdum nøgdum, fáa føroyingar í øllum førum nakað burturúr við øktum førleika og betri kappingarføri.

# 4 Arbeiðsmarknaðurin

Sjónarmið um ymsar skipanir á arbeiðsmarknaðinum, sum Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur skulu eftirkannast. Ymsar forðingar fyri atgongd til arbeiðsmarknaðin verða eisini umrøddar.

**4.1 Tillaging av kørmunum um arbeiðsmarknaðin**

Ein grundleggjandi fortreyt fyri einum vælvirkandi arbeiðsmarknaði er, at rættarligu karmarnir um hann eru tryggir.

Av tí, at eingin arbeiðsrættur er her á landi, hava bæði almennir og privatir arbeiðsgevarar seinasta árið brúkt fútarættin til at loysa átrokandi mál. Óheppið er at fara undir vanlig rættarmál í ósemjum, tí málsviðgerðin tekur alt ov langa tíð.

At brúka fútarættin í arbeiðsrættarligum høpi er nýtt. Leiðandi umboð fyri fakfeløgini hava tikið harðliga til orðanna ímóti, at arbeiðsgevarar í fútarættinum hava fingið niðurlagt fútabann ímóti, at fakfeløg framhaldandi áleggja limum sínum at niðurleggja ávís arbeiði. Ført verður fram, at arbeiðsgevarar fremja ágang ímóti fakfeløgunum og royna at draga eina danska arbeiðsrættarskipan inn í føroysku rættarskipanina gjøgnum fútarættin. Rætturin at brúka fútarættin er ikki nýggjur. Arbeiðsgevarar hava bara ikki verið greiðir yvir, at hesin møguleikin var til staðar, fyrr enn nýliga.

Arbeiðsmarknaðarmál hava verið sermál, líka síðan heimastýrislógin varð sett í gildi, men enn er ikki stovnaður nakar føroyskur arbeiðsrættur. Føroyar hava tí ikki eins og grannalondini ein serskildan arbeiðsrætt, sum kann taka skjótar avgerðir. Hóast royndirnar farna árið vísa, at fútarætturin kann brúkast, er skipanin ikki nøktandi fyri partarnar á arbeiðsmarknaðinum.

Føroya Arbeiðsgevarafelag mælir til, at ferð verður sett á fyrireikingarnar at stovna føroyskan arbeiðsrætt. Fakfeløgini vilja hinvegin stovna ein sokallaðan víðkaðan gerðarætt eftir leisti, sum tey sjálv hava skotið upp. Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur gjørt fakfeløgunum greitt, at felagið altíð er til reiðar at viðgera ein víðkaðan gerðarrætt. Fakfeløgini mugu tó skilja, at ávís minstukrøv eru til eina tílíka arbeiðsmarknaðarskipan, um hon skal fáast at virka. Neyðugt er, at skipanin verður lógarfest, at hon fevnir um allan arbeiðsmarknaðin, og at hon fær myndugleika til at tryggja skjótar loysnir. Tað er ikki nóg mikið, at skipanin er ein sjálvboðin avtala millum ávísar partar á arbeiðsmarknaðinum, sum lagt er upp til í uppskotinum frá fakfeløgunum. Skipanin skal til dømis eisini kunna loysa spurningar um fakmørk millum fakfeløg. Hetta er ein trupulleiki, sum óbeinleiðis rakar arbeiðsgevarar.

Lóg um seming í arbeiðsósemjun eigur eisini at verða broytt og dagførd. Í dag kann koma fyri, at semingsmenninir sýta fyri at koma upp í samráðingar orsakað av løgfrøðiligari óvissu. Eitt dømi er samráðingarnar millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Starvsmannafelagið um sáttmálan fyri Føroya Tele. Neyðugt er við eini semingslóg, sum fevnir um allan arbeiðsmarknaðin. Semings-

menn skulu við hesi lógini í hondini kunnu royna semju millum partarnar, um partarnir vilja tað ella ikki.

**4.2 Forðingar fyri atgongd til arbeiðsmarknaðin**

Í løtuni er arbeiði til allar hendur og meira enn tað. Virkir kring landið vísa á trupulleikar við at fáa arbeiðsmegi. Hesin trongin á arbeiðsmarknaðinum kann skapa eina ónda ringrás við lønarglíðing og prísvøkstri. Samstundis kann staðfestast, at ávísur partur av møguligu arbeiðsmegini er ikki tøkur vegna ymsar forðingar.

Ein av forðingunum er ansingartrupulleikar. Hesin trupulleikin vísir seg bæði í sambandi við børn, gomul og sjúk. Barnaansingartrupulleikin er enn stórur nógvastaðni. Tá barnsburðarfarloyvið er av, sleppa foreldrini ikki aftur til arbeiðis, tí tey fáa ikki børnini ansað. Tey mugu tí dúva upp á familju og kenningar. Barnaansingin er eisini ein stórur trupulleiki fyri føroyskar familjur, sum ætla at flyta heim. Tær setast mangan aftur. Somu trupulleikar standast av vantandi ansing av gomlum og sjúkum.

Føroyska samfelagið hevur seinastu árini tikið nøkur stig til at bøta um hesar vælferðartænasturnar, men enn er langt á mál, og sum Búðskaparráðið vísir á í síni síðstu frágreiðing, kann hetta samfelagsliga ikki góðtakast.

Ein annar trupulleiki er atgongd til bústaðir og kostnaðurin av teimum, serliga í høvuðsstaðarøkinum. Hesin trupulleikin er uttan iva eisini ein forðing fyri, at fleiri føroyingar, sum hava nomið sær lærdóm uttanlands, flyta heimaftur.

Føroya Arbeiðsgevarafelag mælir staðiliga til, at myndugleikarnar taka hesar forðingar í álvara. Tað ber ikki til, at myndugleikarnar skáka sær undan trupulleikum, sum familjurnar einsamallar ikki kunnu loysa. Karmar, sum bøtast má um beinanvegin, eru barnaansingin, eldraøkið og íbúðarviðurskiftini.

**4.3 Heilsa, trygd og umhvøri**

*4.3.1 Innanhýsis skipanir á virkinum*

Nógv hevur verið tosað um tey trý lyklaorðini heilsu, trygd og umhvørvi (HTU) seinastu tíðina. Skulu vørur ella tænastur veitast innan frálandavinnu, krevja fyristøðufeløgini, at virksemið er væl skipað, eisini við atliti til HTU-viðurskiftini.

Krøvini verða ikki einans sett her hjá okkum. Flestu oljufeløgini virka um allan heimin, og krøvini, tey seta sær sjálvum og øllum teimum, tey samstarva við, eru mangan ein samanseting av krøvum innanífrá og tí, sum annars rørir seg í samfelagnum. Størsta avbjóðingin fyri okkum føroyingar hesum viðvíkjandi er at viðurkenna, at ein hugburðarbroyting krevst. Fremja vit hana og laga okkum eftir krøvunum, koma vit skjótt á støðið hjá okkara grannalondum.

Skulu starvsfólk, viðskiftafólk og onnur fata eitt virki sum ábyrgdarfult, mugu HTU-krøvini náturliga koma innanfrá. Eitt arbeiðspláss kann ikki góðtaka, at fólk fáa skaða, hvørki av óhappi ella av langtíðarávirkan. Heldur ikki kann góðtakast, at materiell virðir og umhvørvið eru fyri óneyðugum árinum.

Verður eitt virki rikið á skilagóðan hátt, hevur tað fleiri fyrimunir við sær. Trivnaðurin hjá starvsfólkunum økist, óvæntaðu hendingarnar fækka, ásett lógarkrøv verða uppfylt, og virkið kann skjótt umskipa seg til nýggj krøv. Haraftrat hava virkir, sum allatíðina laga seg til krøvini, færri útreiðslur enn virkir, sum ikki gera tað. At seta í verk tílíka skipan krevur bæði orku og pening í byrjanini, og skal ein tílík skipan gerast veruleiki, er neyðugt, at leiðslan hevur ein virknan leiklut.

Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur, at virkisleiðslur eiga at geva hesum øki meira gætur. Nógv virkir eru seinnu árini farin undir góðskustýring. Skipanir, ið fevna um HTU-viðurskiftir, eru ein natúrlig víðkan av góðskuhugsunarháttinum.

*4.3.2. Umhvørvisverndarlógin og umhvørviskrøv*

Fleiri virkir hava vent sær til Føroya Arbeiðsgevarafelag viðvíkjandi ásetingum av umhvørviskrøvum. Trupulleikin er, at eitt nú donsk umhvørviskrøv ella krøv til virkisumhvørvisgóðkenningar verða sett í gildi í Føroyum, uttan at

fyrilit verða tikin fyri serligum føroyskum umstøðum, og uttan at vinnan verður tikin við upp á ráð.

Ongin ivi er um, at Føroya Arbeiðsgevarafelag tekur undir við at seta føroyskum virkjum umhvørviskrøv. Men neyðugt er at greina teir umhvørvistrupulleikar, sum vinnan er atvoldin til í Føroyum, og síðan seta umhvørviskrøv, sum taka fyrilit fyri serliga bústaðarmynstrinum, so krøvini verða realistisk.

Føroyska búsetingarmynstrið er í nógvum førum øðrvísi enn í samfeløgunum kring okkum. Vit hava frá gamlari tíð ikki havt eitt búsetingarmynstur, sum skilti vinnuøkir, havnarløg og bústaðarøkir sundur. Bæði virkir og bústaðir eru staðsett so nær havnarlagnum sum gjørligt fyri at fáa gagn av teimum møguleikum, sum havið gevur.

Vanligt er aðrastaðni, at avvarðandi myndugleikar viðgera umhvørviskrøv saman við vinnufeløgum, áðrenn reglur í sambandi við lógina verða ásettar. Føroya Arbeiðsgevarafelag mælir til at brúka somu mannagongd í Føroyum, og at eitt umhvørvisráð verður sett á stovn, sum er mannað við pørtunum á arbeiðsmarknaðinum eins og Arbeiðsumhvørvisráðið.

Somuleiðis mælir felagið til, at skipanin við umhvørvisgóðkenningum av virkjum verður broytt soleiðis, at felags umhvørviskrøv verða ásett fyri hvørja vinnugrein og ikki sum nú fyri hvørt virki sær. Eisini eigur verandi mannagongd at verða broytt soleiðis, at virkini samsvarandi settu krøvunum gera uppskot um, hvussu tey ætla at lúka tær treytir, sum umhvørvismyndugleikin ásetir, og senda Heilsufrøðiligu Starvsstovuni tey. Virkini skulu síðan hava bindandi tilsøgn um umhvørvisgóðkenning sambært sínum ætlanum. Talan er um somu mannagongd, sum brúkt verður í oljuvinnuni. Henda loysn er greiðari fyri vinnuna og hevði lætt um arbeiðið hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni.

**4.4 Tillagingar av ALS skipanini**

Í tíggju ár hava partarnir á arbeiðsmarknaðinum við umboðanini í ALS-stýrinum røkt eina samfelagsuppgávu, sum almennir myndugleikar í flestu londum halda, at tað almenna skal reka. Hesi tíggju árini hava óivað verið tey torførastu í Føroya nýggjaru søgu, tá ræður um viðurskiftini á arbeiðsmarknaðinum, og tað vóru partarnir á arbeiðsmarknaðinum, sum tóku tyngsta sleipið undir kreppuni.

Partarnir halda, at tað er ein fyrimunur, at ALS-skipanin er leys av almennu skipanini, tí tað vísir seg at vera sera trupult hjá landsins myndugleikum at taka truplar avgerðir í góðum tíðum. Betri er, at eitt stýri samansett við pørtunum á arbeiðsmarknaðinum stýrir ALS, tí fremsta málið hjá pørtunum er at hava eina burðardygga arbeiðsloysisskipan til starvsfólkini bæði í góðum og ringum tíðum, sum er so sterk fíggjarliga, at hon megnar at standa ímóti eini líka stórari kreppu sum teirri í nítiárunum.

Fakfeløgini hava seinasta árið sett fram ynski um, at útgjaldið úr skipanini hækkar upp í 80 prosent av eini arbeiðsmannaløn úr verandi 70 prosentum.

Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur, at áðrenn útgjaldið verður hækkað, eigur at verða róð aftur á beint í mun til upprunaligu skipanina. Eftir okkara tykki er neyðugt at seta inngjaldsloftið innaftur í skipanina, og útgjaldstíðarskeiðið eigur at verða stytt.

Broytingarnar, sum hendu í ALS-skipanini kreppuárini, hava flutt hana nakað burtur frá upprunaligu ætlanunum, ið høvdu støði í tryggingarmeginregluni. At hækka útgjaldið, áðrenn inngjaldsloftið er fingið í rættlag, fer at flyta skipanina uppaftur longri burtur frá upprunaligu ætlanini. Dagatalið í skipanini varð longt í kreppútíðum. Allur fakkunnleiki sigur, at tað er kryplandi fyri tann einstaka at vera ov leingi arbeiðsleysur. Tí eigur útgjaldstíðarskeiðið at verða stytt.

**4.5 Arbeiðsmarknaðarlógir**

Seinastu árini hava ymisk uppskot verið til viðgerðar í tinginum, sum kundu havt við sær, at føroyski arbeiðsmarknaðurin broyttist. Undir valorrustuni vóru uppskotini aftur frammi. Sum dømi kunnu nevnast lógaruppskot um hópuppsagnir og setanartreytir.

Hóast hesi uppskot ikki vórðu samtykt, ávarar Føroya Arbeiðsgevarafelag ímóti, at danskar lógir og ES-arbeiðsmarknaðarlógir fara at mynda okkara arbeiðsmarknað. Úrslitið kann gerast, at vit fáa ein líka stirvnan arbeiðsmarknað sum fleiri av ES-londunum.

Nevnast kann í hesum sambandi, at lutfalsliga fá fólk hætta sær undir at stovna egið virki í Danmark og øðrum ES-londum, tí nógvar lógir og reglur køva framtakshugin og fyritakssemið. Politikararnir eiga at hava hetta í huga, tá teir seta í gildi arbeiðsmarknaðarlógir, serliga tá teir tosa um tørvin á arbeiðsplássum og nýggjum møguleikum úti um landið.

Prísurin fyri ein arbeiðsmarknað, sum er neyvt stýrdur av lógum, er, at virkini vaksa, og at miðsavningin tekur dik á seg. Tey smáu virkini hava snøgt sagt ilt við at lyfta umsitingarligu byrðarnar og fíggjarligu bindingarnar, ið standast av strongu lógarstýringini. Tí hongur tað ikki saman, um politikarar bæði tosa um at spjaða arbeiðspláss út um landið og samstundis leggja umsitingarligar fótonglar í vegin fyri fólk, sum vilja stovna egið virki.

Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur, at skipað og greið viðurskifti skulu valda á arbeiðsmarknaðinum, men at partarnir á arbeiðsmarknaðinum sjálvir skulu greiða viðurskiftini sínámillum. Felagið ger eisini vart við, at føroyskir lógarkarmar mugu hóska til føroyska arbeiðsmarknaðin og ikki vera avskrivað ES-direktiv.

**4.6 Eftirlønarskipan**

Samgongan 1998-2002 viðgjørdi eina eftirlønarskipan fyri allan arbeiðsmarknaðin, men kom ikki á mál við henni, tí ymsar meiningar vóru um tey grundsjónarmið, sum skipanin skuldi byggja á.

Nú nýggj samgonga hevur tikið við, er ikki greitt enn, hvør landsstýrismaður hevur málsøkið eftirlønir. Hetta er sera óheppið. Um eitt hálvt ár byrja nýggjar sáttmálasamráðingar á arbeiðsmarknaðinum, og tað hevur tí stóran týdning fyri partarnar á arbeiðsmarknaðinum at vita, hvat fer at henda á økinum.

Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur, at tað almenna ikki eigur at gera eina serstaka eftirlønarskipan, men heldur byggja á tær skipanir, sum longu eru innan allar lønarsáttmálar á føroyska arbeiðsmarknaðinum.

Leikluturin hjá tí almenna er í flest øllum førum at skapa karmar, eisini viðvíkjandi eftirlønum. Tað skal seta neyðug krøv og eftir teimum góðkenna verandi skipanir ella krevja tillagingar í teimum.

Um tað almenna vil tryggja, at allir løntakarar hava eitt útgjald á ávísum støði, tá teir fara av arbeiðsmarknaðinum, er nóg mikið at seta eitt minstamark fyri, hvat hvør einstakur skal gjalda inn í eina góðkenda skipan.

Finnur landsstýrið ikki út av, hvat tað vil innan stutta tíð, heldur Føroya Arbeiðsgevarafelag, at tað skal lata málið upp í hendurnar á pørtunum á arbeiðsmarknaðinum og als ikki løggeva á økinum.

## 5 Vinnan, útbúgvingarøkið og gransking

Hyggja vit at altjóða rákinum, síggja vit, at globaliseringin hevur við sær nýggjar marknaðarumstøður, nýggja tøkni og økt kundakrøv um skjótari vøruútskifting og vørur, sum nøkta ymiskleikan hjá tí einstaka.

Sagt verður, at frumevnini hjá framkomnu londunum verða evnini til at nema nýggja vitan og umseta hana til vørur og tænastur, sum marknaðurin krevur. Starvsfólk við hollari vitan verða týdningarmesta tilfeingið, tí bert starvsfólk við frálíkum eginleikum tryggja áhaldandi framburð.

Neyðugt er tí, at Føroyar í størri mun leggja dent á at menna útbúgvingarøkið og granskingina. Alt útbúgvingarverkið eigur at verða eftirkannað, og neyðugar bygnaðarbroytingar mugu fremjast, so føroyingar fáa útbúgvingar, ið teljast millum tær bestu, og samstundis fáa sum mest fyri hvørja nýtta krónu.

Tá Mentamálaráðið á heysti 1999 legði fram álit um útbúgvingar- og granskingarpolitikk, lýsti Føroya Arbeiðsgevarafelag síni sjónarmið í stuttum soleiðis:

- Grundútbúgvingar í fólkaskúlanum og miðnámsútbúgvingar skulu vera á høgum støði og samskipaðar, so kostnaðurin kann haldast á einum rímiligum støði.
- Útbúgvingar á hægri stigi skulu vera málrættaðar eftir samfelagsligum og vinnuligum tørvi. Tær skulu heldur vera á kandidatstøði enn á millumstøði og so liðiligar, at tær skjótt kunnu tillagast broyttum tørvi.
- Neyðugt er við liðiligum eftirútbúgvingarskipanum, ið kunnu tillagast tørvinum hjá tí einstaka
- Tætt samstarv við útbúgvingarkervi uttanlands
- Høgt tøkniligt støði
- Myndugleikar og vinna skulu samstarva um økta vinnugransking
- Neyðugt við granskingardepli, sum tekur støði í vinnuligu møguleikum okkara (tað maritima, fiskivinna, matvørugóðsking og tilíkt)
- Tiltøk setast í verk, sum fremja vitanarkrevjandi privata vinnu

**5.1 Broytingar í almennu skúlaskipanini**

Niðanfyri er settur upp ein listi við nøkrum broytingaruppskotum, sum vit mæla til at fremja. Listin er ikki endaligur. Hann er ætlaður sum íkast til kjak um almennu 13 ára útbúgvingarskipanina.

*5.1.1 Fólkaskúlin*

Fólkaskúlin er týdningarmikil fyri menning av øllum borgarum og tí eisini ein hornasteinur undir einum framkomnum vinnulívi. Hann leggur útbúgvingarstøðið fyri nýggja ættarliðið av starvsfólkum í vinnuni. Í fólkaskúlanum fáa vit teir grundleggjandi førleikarnar, sum restin av útbúgvingarskipanini og í síðsta enda eisini virkini byggja á. Umvegis skattin rinda borgarar og vinnan fyri skúlan. Raksturin av fólkaskúlanum er við øðrum orðum ein tydningarmikil uppgáva.

Fyri vinnuna er tað avgerandi, at skúlarnir geva børnum og ungum so mikið av førleikum, at tey kunnu uppfylla tey støðugt hækkandi førleikakrøvini á arbeiðsmarknaðinum. Samstundis er umráðandi, at skúlin verður rikin á einum fíggjarliga effektivum grundarlag. Tað vil siga, at næmingarnir skulu hava best møguligu undirvísingina fyri minst møguligan kostnað hjá landi og kommunum.

Í samgonguskjalinum stendur, at fólkaskúlalógin skal eftirmetast. Hetta er lítið ítøkiligt. Her vantar ein veruligur politikkur. Føroya Arbeiðsgevarafelag mælir til, at lagdur verður størri dentur á tað fakliga. Vit hava fyrr víst á, at nógv virkir fýlast á grundleggjandi førleikarnar hjá teimum ungu innan lesing, staving og rokning. Eisini halda vit, at størri dentur skal leggjast á enskt í fólkaskúlanum. Globaliseringin og ein møgulig oljuvinna seta stór krøv til málkunnleikan. Týðiliga sæst í oljuvinnuni, at føroyingar eru ikki nóg dugnaligir í enskum. Enskt eigur tí at gerast lærugrein heilt tíðliga, kanska longu í 1. flokki.

Dygdarmenning og eftirmeting av góðsku í øllum liðum eigur eisini at vera fastur táttur í skúlanum. *Benchmarking* verður í øðrum londum nýtt sum natúrligt amboð innan skúlaverkið.

Vit halda eisini, at strangari krøv eiga at verða sett læraraútbúgvingini. Hyggjast má nærri at treytunum fyri at standa próvtøku, og ein dygdarmeting eigur at verða gjørd, sum samanber Føroya Læraraskúla við læraraskúlar aðrastaðni.

*5.1.2 Miðnámsskúlin*

Vinnulívið hevur langt síðan ásannað, at vitanin mennist við øgiligari ferð. Tað, sum varð lært í fjør, kann vera avoldað í dag. Neyðugt er tí bæði at veita næmingunum grundvitan og at læra teir arbeiðshættir. Eftir okkara tykki hava miðnámsskúlarnir í ov lítlan mun lagað seg til henda veruleika. Skal ungdómurin mennast til víðari lestur ella luttøku í vinnulívinum, má leikluturin hjá næmingunum gerast virknari. Teir mugu í størri mun gera royndir, kanna, søkja og brúka vitan. Hetta má gerast við verkætlanum, har vitan innan fleiri fakøkir verður brúkt. Eisini mugu nýggir próvtøkuhættir vinna frama, sum ikki einans eggja næmingunum til at læra alt uttanat. Eisini her eru verkætlanir ein hentur arbeiðsháttur.

Tílík umlegging setir sjálvsagt krøv til læraran. Hann verður meira ráðgevi enn undirvísari.

Føroya Arbeiðsgevarafelag mælir til, at minni verður gjørt burturúr at bólka studentaskúlanæmingar í matematiska og málsliga deild. Ein samantvinning av lærugreinum innan náttúruvísind, hugvísund, mál og samfelagsvísind svarar betur til tey krøv, sum samfelagið og vinnan í framtíðini fara at seta.

Eisini í miðnámsskúlunum skal miðvís dygdarmenning setast í verk, tað vil siga málstýring og eftirmeting av góðsku í øllum tættum skúlans.

*5.1.3 Yrkisútbúgvingar*

Skúla- og útbúgvingarskipanirnar í Føroyum hava í stóran mun havt støði í donskum skipanum. Soleiðis er eisini við yrkisútbúgvingarskipanini. Lagið hevur mangan verið, at dagføringar av skúlaskipanum í Føroyum eru gjørdar langt aftaná, at samsvarandi danskar skipanir eru broyttar. Heldur ikki her er yrkisútbúgvingarskipanin nakað undantak.

Arbeitt verður nú við at dagføra skipanina. Skotið hevur verið upp at broyta handverksútbúgvingarnar soleiðis, at:

- allar handverksútbúgvingar vara 3 ár
- áðrenn sáttmáli verður gjørdur við lærling, skal lærlingurin hava lokið 1 árs grundútbúgving á tekniskum skúla
- grundútbúgvingin skal avloysa SIT og partar í skúlagongdini hjá lærlingum
- bókliga støðið í handverksútbúgvingunum verður á C-stigi

Vinnuumboðini í yrkisnevndunum ivast í, um kósin er røtt. Tey nevna tveir megintrupulleikar:

– at skúlatíðin er ov long samanborið við verkligu lærutíðina
– at vit flyta okkum móti eini skipan, har virkini ikki longur seta lærlingar

Í Danmark vita umleið 90 prosent av teimum ungu, hvørja útbúgving tey ætla sær, tá ið tey byrja á yrkisskúlunum, og tey vænta at fáa sína lærugrein beinanvegin. Men soleiðis sum undirvísingin á yrkisskúlunum nú er løgd til rættis, fata fleiri teirra yrkisskúlarnar sum framhald av fólkaskúlanum. Tey fáa ikki ta lærugrein, tey ætlaðu sær, og ynskið um at uppliva nakað, sum er øðrvísi enn fólkaskúlin, verður ikki gingið á møti. Hetta verður eisini lagið í Føroyum, um 1 árs grundskúlaskeið verður sett í gildi.

Sum heild kann sigast um yrkisútbúgvingarskipanina, at hon byggir á eina skiftisskipan, tað vil siga skiftið millum skúlagongd og upplæring á arbeiðsplássinum. Skiftisskipanin er eitt eindømi, sum vit eiga at verja. Skipanin ger tað lættari at fara úr útbúgving í arbeiði. Tey ungu við yrkisútbúgving fáa gott innlit í umstøðurnar hjá virkjunum, og virkini fáa innlit í, hvat tey ungu halda um arbeiðsmarknaðin. Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur, at lærutíðin er ein tann besta byrjanin á arbeiðsmarknaðinum.

**5.2 Eftirútbúgvingar**

Vinnulívið hevur givið vaksnamannaútbúgving ella eftirútbúgving av vaksnum fólki alsamt størri gætur. Hetta kemst av, at skjóta menningin støðugt ávirkar framleiðslu- og kunningarhættir. Broytingarnar hava við sær krøv um nýggjar og stundum torgreiddar tøkniligar førleikar hjá einstøku starvsfólkunum. Útbúgvingarverkið eigur at vera ein natúrligur samstarvsfelagi hjá vinnulívinum, tá umræður at menna førleikan hjá tí einstaka, so fyritøkur støðugt kunnu vera kappingarførar, hvat dugnaligum starvsfólkum viðvíkur.

Málsetningurin hjá vinnuskúlunum eigur at vera, at teir altíð kunnu bjóða fram útbúgvingar, sum svara til tørvin hjá vinnulívinum. Haraftrat skulu teir helst vera framman fyri sína tíð, so teir eru førir fyri at nøkta tørvin, tá hann tekur seg upp. Hetta setir krøv til smidligan hugburð og nýhugsan á útbúgvingarstovnunum bæði á leiðslustigi og hjá undirvísarunum.

Undirvísingarverkið tykist stundum aftra seg við at broyta undirvísingarhættir og innihaldið í undirvísingini. Hetta ger tað trupult hjá útbúgvingarstovnunum at seta sær nýggj og betri mál. Vantandi eftirmeting og faklig hugleiðing hava eisini við sær, at rokkin úrslit ikki gerast betri. Avleiðingin av hesum er, at vinnulívið fær trupulleikar av starvsfólkum, sum ikki eru nóg væl útbúgvin til at uppfylla tey krøv, sum kappingarstøðan hjá fyritøkunum setir.

Fyri at bøta um sovorðnar trupulleikar er neyðugt, at vinnulív og útbúgvingarstovnar tosa saman. Her eigur vinnulívið eisini at gera sítt. Tað má vera virknari í útbúgvingarverkinum og greiða frá sínum ynskjum og krøvum.

Vinnulívið hevur tørv á tveimum sløgum av vaksnamannaútbúgvingum:

– Styttri serútbúgvingar, sum hava við sær førleikamenning innan avmarkað yrkisøki
– Miðaldrúgvar tvørfakligar útbúgvingar, sum bøta um heildarfatanina hjá tí einstaka

Týdningarmikið í sambandi við styttru serútbúgvingarnar er, at undirvísingin er løgd soleiðis til rættis, at fyritøkurnar ikki halda, at starvsfólkini brúka óneyðuga nógva tíð og orku upp á tær. Undirvísingarstovnarnir eiga at bjóða fram intensiva undirvísing í modulum í nakrar dagar í senn og skulu umhugsa øðrvísi undirvísingarhættir, eitt nú fjarundirvísing um alnótina.

Tær meðaldrúgvu tvørfakligu útbúgvingarnar eiga at verða gjørdar í tøttum samstarvi við vinnulívið og aðrar viðkomandi undirvísingarstovnar. Neyðugt er eisini við tvørfakligum samstarvi innanhýsis á einstøku stovnunum og millum stovnar, til dømis innan fiskivinnuna, har tørvur er á eini heildarfatan av handilsligum, framleiðslutøkniligum og lívfrøðiligum viðurskiftum. Samstarv millum Handilsskúlan, Tekniska skúla og Fiskivinnuskúlan er í hesum sambandi upplagt.

Um neyðugi førleikin til serundirvísing vantar í Føroyum, eiga einstøku skúlarnir at taka upp samstarv við serskúlar uttanlands, sum hava neyðuga førleikan. Eisini her hevur tað stóran týdning, at skúlarnir ásanna og lýsa sítt undirvísingarøki og so fáa sær samstarvsfelagar á teimum økjum, sum teirra egna øki ikki fevnir um. Hetta er neyðugt fyri at nøkta tann tørv, sum vinnulívið hevur á undirvísingartilboðum.

Samanumtikið heldur Arbeiðsgevarafelagið, at einstøku útbúgvingarstovnarnir skulu gerast liðiligari, tá umræður at nøkta tørvin hjá vinnulívinum á eftirútbúgvingum og í sambandi við broytingar í undirvísingarhættum. Eisini skulu teir leggja seg eftir at samstarva sínámillum og við vinnulívið.

**5.3 Fróðskaparsetrið – krøv til gransking og granskarar**

Í álitinum um útbúgvingar- og granskingarpolitikk frá 1999 verður mælt til, at gransking í Føroyum verður raðfest og samskipað undir Fróðskaparsetrinum í nýggjari depilsskipan. Eisini verður sagt, at arbeitt verður fyri, at privata vinnulívið er við til at fíggja endamálsgransking og menningarætlanir.

Eyðsæð er, at størri orka eigur at verða nýtt til gransking í Føroyum. Fróðskaparsetrið skal verja mentanararv føroyinga, men neyðugt er at gera greitt, hvørji onnur økir granskingin skal fevna um.

Kanska størsti denturin skal leggjast á gransking innan vinnur, sum hava kappingarfyrimunir á altjóða marknaðinum, til dømis innan fiskivinnuna og alivinnuna. Í øllum førum eigur at verða arbeitt meira miðvíst við málsetningum og krøvum til gransking og granskarar í Føroyum. Hetta er eisini galdandi fyri granskingarvirksemið á Fróðskaparsetrinum.

Neyðugt er eisini at endurskoða leiðslubygnaðin á Fróðskaparsetrinum, so bygnaðurin gerst meira tíðarhóskandi. Leiðslubygnaðurin í framtíðini skal tryggja, at ábyrgd og myndugleiki fylgjast, tá umræður avgerðarrætt um førleika og tilfeingið á stovninum.

Arbeiðið við Menas-frágreiðingini vísti, at Fróðskaparsetrið hevði trupult við at samstarva ella at halda ein sáttmála við vinnuna. Miseydnaða royndin var óheppin og kann hava við sær, at virkir í framtíðini aftra seg við at fara undir tílíkar royndir. Vinnan heldur, at Fróðskaparsetrið má stýra sínum verkætlanum betur, knýta granskarar aftrat sær við størri umhugsni og leggja størri dent á úrslit, sum granskararnir eisini mugu levera.

Arbeiðsgevarafelagið ásannar, at akademisku kreftirnar í samfelagnum eru spjaddar út á fleiri ymiskar stovnar. Men neyðugt er samskipa tær, so gransk-

ingin og menningin kunnu halda fram. Fróðskaparsetrið átti saman við fleiri av hinum skúlunum og stovnunum, sum bjóða víðari lestur og reka granskingarvirksemi, at brotið upp úr nýggjum við øktum samstarvi. Tá hevði uttan iva ligið betur fyri hjá Fróðskaparsetrinum at drigið at sær neyðuga tilfeingið, bæði hvat fígging og førleika viðvíkur.

**5.4 KT-útbúgvingar**

Umráðandi er at undirvísa í kunningartøkni og menna nýtsluna av tøknini, so føroyskar fyritøkur fáa neyðuga førleikan at standa seg í altjóða og heimligari kapping. Heldur undirvísingin í fólkaskúlanum, á miðnámsskúlunum og í hægru skúlunum fram, hækkar støðið hjá føroyskum KT-veitarum. Ágóðan fáa vinnan og samfelagið annars. Við mentum KT-útbúgvingum økjast møguleikarnir eisini fyri føroyskari nýskapan innan kunningartøkni, ið aftur kann hava við sær nýggjar vinnur.

**5.5 Vinnugransking og vinnulokomotiv**

Føroyska vinnulívið brúkar munandi minni pening upp á gransking, enn gjørt verður aðrastaðni. Fýlst hevur verið á hetta, men havast skal í huga, at í Føroyum eru sera fáar stórar fyritøkur, sum hava orku til at seta pening í gransking við langtíðarvinningi fyri eyga. Støðan gerst ikki betri av, at almenna játtanin til gransking er sera lítil og í lítlan mun ætlað vinnugransking.

Vinnugransking í Føroyum eigur at hava støði í teimum vinnum, sum hava kappingarfyrimunir á altjóða marknaðinum. Endamálið við granskingini má vera at vinna meira burtur úr verandi tilfeingi, so tey virðir, vit higartil ikki hava givið ans, verða gagnnýtt. Biogranskingin er gott dømi. Granskingarvirksemi av hesum slag hevði havt við sær krøv og avbjóðingar, sum kundu fingið dugnaligar føroyingar og útlendingar higar at granskað. Biogranskingin hevði eisini havt við sær, at Fróðskaparsetrið og miðnámsskúlarnir kundu økt um undirvísingarførleikan, og at avbjóðingarnar og marknaðurin hjá KT-vinnuni vuksu.

Avleidda virksemið av einum framsóknum granskingarvirksemi innan ávísa vinnugrein hevði eisini verið, at føroyskar fyritøkur høvdu bøtt um sína kappingarstøðu, tí til hevði borið at ment verandi framleiðslu, og nýggjar fyritøkur høvdu sæð dagsins ljós.

Skal nakað munagott gerast á hesum øki, krevst peningur. Føroyingar hava í sambandi við oljuleitingina fingið væl av peningi til førleikamenning. Her eru ótroyttir møguleikar. Vit eiga at uppfata gransking sum eina vinnuliga íløgu og finna fram til íleggjarar, sum vilja seta pening í vinnugransking. Hetta ber til í øðrum londum, so tað skuldi eisini borið til í Føroyum.

Eitt dømi um gransking, sum útlendskir íleggjarar og granskarar hava áhuga fyri, er arvagranskingin. Illa ber til at menna hesa granskingina í løtuni, tí lóg-arkarmarnir vanta. Her kann ein møguleiki fyri mentum granskingarumhvørvi gleppa føroyingum av hondum, tí politiski myndugleikin ikki skapar neyðugu karmarnar.

Avgerandi fyri eina tilgongd móti øktari vinnugransking er, at vit hava nakrar stórar fyritøkur, sum hava styrki til at vera lokomotivið hjá hinum, og sum bæði við egnari megi, stuðli og váðafúsum kapitali kunnu seta munagóða orku av til gransking innan ávís økir í nøkur ár.

Føroya Arbeiðsgevarafelag vil styrkja samstarvið millum Vinnuhúsið, fyritøkur og relevantar almennar stovnar, so komast kann longur fram á leið á hesum øki.

**5.6 Skipan av almennum grunnum og játtanum til gransking og menning**

Vit hava í dag 8 grunnar ella grunnlíknandi játtanir, sum fevna um 4 ráð í umsitingini. Ymiskt er, hvussu stórar játtanirnar eru, og hvat tær skulu brúkast til. Nýtsluøkið fevnir um gransking og menning í breiðastu merking. Játtanirnar eru ætlaðar einum samfelagsliga breiðum málbólki í vinnulívinum og almenna sektorinum. Best hevði verið, um virksemið, sum hesar játtanir fíggja, var við til at byggja brýr tvørtur um sektorar millum alment og privat og eisini føroyskt og útlendskt.

Í dag eru játtanirnar slakar 40 milliónir krónur. Politisk undirtøka tykist vera fyri teimum, tí menning av ymsu sektorunum, bæði tí almenna og tí vinnuliga, snýr seg um at menna vitanarstøðið, sum er ein fortreyt fyri betri lønsemi og kappingarføri í vinnuni og betri almennari fyrisiting og ráðgeving.

Ikki er óhugsandi, at vit fáa fleiri tílíkar grunnar, tí Løgmálaráðið, Fíggjarmálaráðið og Heilsumálaráðið hava ikki grunnar til gransking og menning. Fleiri av verandi grunnum eru eisini smáir og muna lítið og onki. Trýstið at fáa fleiri grunnar fer tí at økjast. Um 5-10 ár eru kanska millum 7 og 10 grunnar, ið umsita 80-100 milliónir krónur.

Í seinastuni er fyrisitingin av hesum játtanum broytt. Eitt nú hevur Vinnumálaráðið savnað fleiri játtanir í sama grunn, Vinnuframagrunnin. Fiskimálaráðið hevur sett ein samskipara í fiskivinnugransking, sum eisini skal endurskoða fyrisitingarligar mannagongdir í játtanunum hjá Fiskimálaráðnum. Mentamálaráðið hevur í uppskoti at økja játtanina til Mentunargrunnin, og stjóri er settur fyri Granskingargrunnin.

Sostatt er almenna fyrisitingin í ferð við at hyggja nærri at øllum hesum skipanum.

*Trupulleikar*

Nevndu játtanir hava ymiska støðd, ymiska søguliga bakgrund og ymiskan kultur. Hetta kávar út yvir, hvussu nógv játtanirnar hóast alt líkjast, og hevur við sær ymsar meira ella minni óhepnar mannagongdir. Trupulleikarnir eru:

- Einstakar játtanir eru ov smáar og muna tí næstan onki til at halda lív í einum menningarvirksemi, sum sæst aftur í samfelagnum.
- Játtanirnar eru ikki fíggjarliga mentar at hava egna umsiting.
- Vantandi umsiting ger programmarbeiðið (hvat pengarnir skulu brúkast til) veikt, og lítið og onki verður gjørt við eftirmetingar. Ongin útfarandi kraft er heldur í umsitingini. Koma ongar umsóknir, verður ongin peningur brúktur.
- Málsviðgerðin er í fleiri førum rættiliga nær politiska myndugleikanum, sum kann hava ilt við at halda fingarnar hjá sær sjálvum.
- Mannagongdirnar eru ikki kundavinarligar og haraftrat ymiskar.
- Almenna fíggjarskipanin ger, at játtanir fella burtur við árslok hvørt ár.

*Felags eyðkenni*

Umsitingarnar av hesum játtanum hava fleiri felags eyðkenni:

- Játtanirnar eru allar til menning og gransking.
- Játtanirnar verða mest brúktar til at fíggja ymiskar verkætlanir
- Tørvur er á felags menning av mannagongdum í málsviðgerðini (viðgerð av umsóknum, uppfylgingar, eftirmetingar vm)
- Tørvur er á felags menning av fíggjarstýring (lógarheimildir, útgjaldsskipanir osv)
- Tørvur er á felags menning av programmarbeiðinum (serliga at finna mørkini teirra millum)
- Tørvur er á felags menning av uppsøkjandi arbeiði. Málsviðgerarnir eiga at verða nógv meira útfarandi og sjónligir í samfelagnum, so vinna, stovnar og einstaklingar fáa holla vitan um hesar játtanir, hvat tær fíggja, og hvussu tær gera tað.

*Samskipan – eitt felags grunnahús*

Ongin ivi man vera um, at ein felags umsiting í einum felags umhvørvi hevði verið ein gongd leið til tess at ment umsitingarnar av játtanunum. Málsviðgerar og ymsu ráðini kundu lært hvør av øðrum. Í byrjanini kundi hetta verið skipað sum samstarv millum umsitingarmar.

Fyrimunirnir við einum grunnahúsi eru fleiri:

- Felags hølir, útgerð, heimasíða o.a.
- Felags mannagongdir fyri málsviðgerð, standardiserað umsóknarbløð, útgjaldsskipan vm.
- Felags kunning, ársfrágreiðing, kunningarskriv o.a.
- Fakligt umhvørvi: programmkjak, felags satsingar, felags uppsøkjandi arbeiði, ráðgeving tvørtur um sektormørk, sektorar finna saman v.m.
- Kundavinarligt – alt á sama stað, somu mannagongdir og stórt gjøgnumskygni.

### 5.7 Framtíðar senario

Stig eiga at verða tikin til at seta upp nøkur senario fyri føroyska samfelagið. Vit skulu ímynda okkum samfelagsstøðuna, sum vit ynskja okkum hana. Síðan staðfesta vit, hvar vit eru í støðd í mun til ynskisamfelagið, og so finna vit fram til tiltøkini, sum skulu fremjast fyri at røkka tí ynskta.

Dømi um evni til tílíkar kanningar:
*A) Arbeiðsmegin:* Hvussu sær arbeiðsmegin út komandi 10 árini, og hvørji krøv setir tað til vinnulívið?
*B) Oljan:* At vit onga olju finna í lønandi nøgdum, men framvegis leita. At okkurt av samtøkunum fer at útbyggja, meðan hini feløgini onki finna. At fleiri samtøk finna olju innan 5 ár.
*C) Búskaparligar broytingar:* Minni ella størri blokkstuðul. Lækkandi fiskaprísir/veiða og ávirkanin av tí á samfelagsbygnaðin og vinnubygnaðin.

Ítøkilig viðmerking til A): Nógvir føroyingar lesa millumlangar og langar útbúgvingar. Eingin ivi er um, at vinnan eigur at gagnnýta hetta. Vinnan má tó vita, at hesi fólk krevja:

- persónliga og fakliga menning
- góðar leiðarar, sum hjálpa heldur enn at kommandera
- at verða mett sum aktiv og ikki kostnaður
- at kenna seg at vera við til skapa framburð

Nøkur eyðkenni við nýggja ættarliðnum av sonevndum *job shopparum* er, at teir krevja meira frítíð, men arbeiða effektivari, og at lønin ikki telur mest, men lívskvaliteturin. Eitt boð upp á arbeiðsmarknaðin í framtíðini kundi tí verið: Fleksibilitetur, frælsi og álit.

Spurningurin er, um føroyska vinnan er nóg kappingarfør til at gagnnýta hetta aktivið, og um hon fær nóg nógv burtur úr tí. Vit kunnu sjálvandi taka tað, sum tað kemur, men vit kunnu eisini gera, sum mæti danski stórreiðarin Mærsk McKinney Møller segði og hugsa við *rettidig omhu.*

Hetta síðsta heldur Føroya Arbeiðsgevarafelag vera tað rætta at gera. Í hesum sambandi kundi arbeiðshátturin at seta upp senario verið nýttur, so samfelagið kann fyrireikast til at taka ímóti og gagnnýta komandi fólkatilfeingið. Arbeiðið krevur samstarv millum tað almenna, vinnuna og granskingarstovnarnar.

## 6 Skattaskipanin

Skatta- og avgjaldsskipanirnar ávirka í stóran mun kostnaðarstøðið hjá vinnuni. Millum viðgjørdu evnini í hesum partinum eru høgi persónsskatturin og ymsar avgjaldsskipanir.

### 6.1 Skattalógin og bindandi avgerðir

Ein avgerandi partur av vinnukarminum er tann vinnuliga skatta- og avgjaldslóggávan.

Skal grundarlagið, sum fyritøkur taka sínar avgerðir á, halda, er neyðugt, at fyritøkurnar fáa álítandi frágreiðingar um, hvussu ymisku lógarásetingarnar verða umsitnar.

Um eitt virki skal taka eina avgerð, men ivast í, hvussu avgerðin fer at ávirka skattin hjá virkinum, skal virkið við at venda sær til Toll- og Skattstovu Føroya kunna fáa eitt bindandi svar frammanundan.

Í dag ber ikki fyritøkum til at fáa bindandi svar frá Toll- og Skattstovu Føroya, so tær kunnu vera vísar í fíggjarligu avleiðingunum av teirra avgerðum. Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur hetta vera ein álvarsligan trupulleika í umsitingini. Í grannalondunum fáa borgarar og fyritøkur skrivligt svar upp á fyrispurningar um, hvussu lóggávan verður umsitin á einstøkum økjum. Svarini eru bindandi fyri báðar partar.

Vit mæla til, at hetta verður fingið í rættlag sum skjótast.

**6.2 Kappingarførið – persónsskattir**

Fyri vinnuna hevur ikki bara partafelagsskatturin týdning. Persónsskatturin er avgerandi fyri lønarkostnaðin og fyri hugin hjá starvsfólki at arbeiða.

Fólk, sum arbeiða fulla tíð alt árið, gjalda longu toppskatt av tímaløn oman fyri 78,00 krónur ella mánaðarløn oman fyri 12.500 krónur. Hesar lønir eru ikki topplønir. Allar sáttmálalønir liggja oman fyri hetta markið.

Um kommunuskatturin og kirkjuskatturin eru tilsamans 20 prosent, er samlaði skatturin heili 57 prosent av hvørjari vunnari krónu oman fyri 150.000 krónur um árið.

Hetta ger tað sjálvandi minni áhugavert hjá løntakaranum at taka eyka tøk. Verður arbeitt ein tíma ella tveir yvir, verða 57 oyru av hvørjari vunnari krónu inndrigin í skatti, áðrenn lønin verður útgoldin. Aftrat hesum koma so gjøldini til arbeiðsloysistrygging, arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn og barsilsgrunn. Motivatiónin, sum átti at ligið í eini bonusskipan, fánar burtur av hesum, tí hvørja ferð løntakarin kýtir teg, fellur skattahamarin.

Yvirtímin er dýrasti tímin hjá arbeiðsgevaranum og skuldi verið tann besti hjá løntakaranum. Men høgi skatturin ger, at løntakarin fær alt ov lítið burtur úr eyka arbeiði. Tann einasti, sum ger kvettið hendan tíman, er skattamyndugleikin.

Hetta fær løntakararnar at trýsta lønirnar longur upp, men áhaldandi lønarhækkingar hava jú við sær, at kappingarførið hjá vinnuni versnar. Skal bøtast um kappingarførið hjá vinnuni, má tað loysa seg betur at arbeiða eyka. Neyðugt er at lækka skattaprosentið munandi á seinast vunnu krónunum. Samstundis má markið fyri, nær toppskattur verður goldin, setast munandi upp, so seinast vunnu krónurnar í teimum lægstu lønunum ikki verða toppskattaðar. Við øðrum orðum má skattastigin broytast.

**6.3 MVG**

Løgtingslógin um meirvirðisgjald kom í gildi 1. januar 1993. Hon var ein avleiðing av, at Føroyar høvdu gjørt nýggja handilsavtalu við EF. Tollverjan hjá fyritøkum, ið framleiddu til heimamarknaðin, varð tikin av, og nú skuldu føroyskar fyritøkur standa seg í kapping við útlendskar fyritøkur. Samstundis fekk vinnan eina nýggja avgjaldslóggávu at virka eftir. Hetta varð hildið at vera ein stórur fyrimunur, tí nú framleiddu vit í veruleikanum avgjaldsfrítt.

Síðan tá eru fleiri undantøk gjørd í mvg-lógini, og tosað verður javnan um at gera uppaftur fleiri. Undantøkini skapa oftast umsitingarligar trupulleikar bæði fyri vinnuna og umsitingina. Stóri trupulleikin fyri okkum er tó tann, at undantøkini máa støðið undan skipanini, so hon ikki longur hongur saman. Hóskandi kann vera at minna á viðmerkingarnar, sum landsstýrið hevði, tá mvg-lógin varð løgd fyri tingið:

*»Fyri at avgjald kann sigast at vera neutralt yvir fyri vinnulívsbygnaðinum, má tað krav setast til avgjaldsskipanina, at hon er soleiðis løgd til rætttis,*

- *at sama avgjald skal rindast, uttan mun til hvussu nógvar handilsliðir ein vøra fer ígjøgnum,*
- *at avgjaldið í prosentum av prísinum á eini vøru er tað sama, uttan mun til hvørjum virki keyparin keypir frá,*
- *og avgjaldstrýstið er tað sama, uttan mun til um ein vøra er handverksframleidd ella framleidd við størri ella minni maskinu.*

*Við øðrum orðum má ikki vera størri fyrimunur fyri keypara at gera síni keyp hjá einum ávísum latara fram fyri aðrar, og skipanin má ikki mótvirka rationaliseringum innan vinnulívið.«*

Undantøkini í mvg-lógini gera, at vit fáa eitt avskeplað vinnulív á økjunum, sum undantøkini fevna um. Summar vinnur eru mvg-skyldugar, meðan aðrar ikki eru tað. Tá so er statt, hava summar vinnur betri fortreytir enn aðrar, og kappingin verður ójøvn. Soleiðis eigur ikki at vera. Politikarar eiga at skapa góðar og *eins* karmar fyri vinnulívið. Tí eiga stórt sæð øll undantøkini í mvg-lógini at verða avtikin. Er fatanin, at borgararnir rinda ov nógv í meirvirðisgjaldi, tí tað umfatar øll øki, er altíð møguligt at lække gjaldið.

Føroya Arbeiðsgevarafelag sigur tí, at
– mvg-skipanin skal vera so einføld sum til ber
– skipanin skal vera støðug og ikki broytast í heilum
– stuðulspolitikkur ikki eigur at førast gjøgnum mvg-skipanina

Hinvegin tekur Arbeiðsgevarafelagið als ikki undir við at finna aðrar skipanir at avloysa mvg-skipanina. Mvg-skipanin er okkum vitandi einasta avgjaldsskipan, sum leggur avgjaldið í síðsta lið og sostatt loyvir vinnuni at framleiða avgjaldsfrítt. Hetta er neyðugt, skulu vit standa okkum mótvegis okkara útlendsku kappingarneytum, sum allir virka undir mvg-skipanum.

**6.4 Punktgjøldini**

Tá mvg-lógin varð sett í gildi fyri skjótt 10 árum síðani, varð gjørt greitt, at meirvirðisgjaldið skuldi koma í staðin fyri toll og avgjøld. Føroysk vinna skuldi hava somu kor sum vinnur aðrastaðni. Men enn eru punktavgjøld upp á 20-30 prosent á el-lutum.

Tað var kanska í lagi at leggja avgjøld á eitt nú sjónvørp, musikkanlegg og hvítvørur, tá hesi tól vóru marglætislutir, men tann tíðin er farin. Hví er avgjald á sjónvarpinum og ikki á sofuni, sum hyggjarin situr í? Mangt annað marghátt-ligt er í ásetingunum. Punktavgjald verður goldið av forsterkarum, men ikki av hátalarum. Meðan avgjald er á vanligum hvítvørum sum køliskápum og komfýrum, er onki avgjald á eymhettum. Onki avgjald er á elektroniskum fototólum, hóast tey eins og CD-spælarar handfara digital data.

Punktavgjaldið ger, at føroyingar, sum ferðast, í stóran mun keypa el-lutir uttanlands, tí teir spara pengar við at keypa lutirnar har.

Fíggjarmálaráðið hevur nýliga avgjørt at taka av punktavgjaldið á spariperum. Hetta er eitt framstig, men Føroya Arbeiðsgevarafelag mælir til, at punktavgjøldini verða tikin av øllum vørum.

**6.5 Møguleiki fyri inntøkujavning í skatti**

Arbeiðsgevarafelagið og Havbúnaðarfelagið hava fleiri ferðir víst á, at skattareglurnar eru munandi lagaligari í grannalondunum, eitt nú í Norra. Á hesum øki er kappingin tí ikki jøvn. Vit endurtaka tí tilmælið um, at:

- carry back reglur koma inn í føroysku skattalógina sum í Norra, tvs. at skattur goldin eitt ár kann í tvey ár verða goldin felagnum aftur, vísir tað seg, at felagið hevur hall hetta tíðarbilið.
- tíðarbilið, har hall kann førast fram og dragast frá skattliga úrslitinum, verður longt upp í 10 ár.

Her er vert at viðmerkja, at Endurreisingarnevnd landsstýrisins í áliti sínum í 1994 vísti á hesi viðurskiftir. Skattalóg okkara hevur í hesum viðurskiftum støði í teirri donsku, sum er gjørd til donsk samfelagsviðurskifti og ikki eitt samfelag sum tað føroyska. Bæði alivinnan og fiskivinnan eru tengdar at náttúruviðurskiftum og kunnu vera fyri stórum og óvæntaðum broytingum frá ári til árs. Hesum eigur skattalógin at leggja upp fyri.

**6.6 Skattalógin diskriminerar føroysk virkir í oljuhøpi**

Ein skeivleiki er í skattaviðurskiftunum, sum gevur útlendskum fyritøkum fyrimun í oljuhøpi. Lógin sigur, at ein útlendingur, sum arbeiðir hjá útlendskum felag í Føroyum, skal rinda 35 prosent í skatti, meðan sami útlendingur skal rinda 42 prosent, um hann arbeiðir fyri føroyska fyritøku.

Oljuvinnufelagið hevur fleiri ferðir víst myndugleikunum á, at tað er óheppið fyri kappingarstøðuna hjá føroysku fyritøkunum, at útlendingar í starvi hjá teimum rinda meira í skatti, tí í framtíðini er hugsandi, at føroyskar fyritøkur mugu innflyta arbeiðsmegi. Fíggjarmálaráðið sigur seg skilja trupulleikan og upplýsir, at hann er settur á listan yvir broytingar, sum skulu fremjast. Vónandi verða broytingarnar framdar skjótt.

Tað er eisini ein trupulleiki, at ongin dupultskattaavtala er millum Føroyar og Bretland. Væntast kann, at føroyskar fyritøkur fara at arbeiða í bretskum øki, og at enskar fyritøkur fara at arbeiða hjá okkum. Føroya Arbeiðsgevarafelag fer tí at biðja Fíggjarmálaráðið seta ferð á arbeiðið at fáa dupultskattaavtalu við Bretland.

# 7 Almenni sektorurin

Almenni sektorurin ávirkar vinnuna óbeinleiðis umvegis til dømis skattatrýstið. Lagdir verða fram tankar um, hvussu almenni bygnaðurin kann gerast liðiligari og effektivari.

## 7.1 Bygnaður í miðfyrisitingini

Seinastu árini er almenni bygnaðurin umskipaður, 9 ráð eru skipað, aðalstjórar eru settir, og fleiri deildarleiðarar og fulltrúar eru komnir aftrat. Hetta átti at havt við sær, at ábyrgdarbýtið gjørdist greiðari, og at miðfyrisitingin styrkist.

Hóast styrkta miðfyrisitingin er eitt framstig, eigur nú at verða hugt at nøkrum av teimum trupulleikum, sum bygnaðurin hevur.

### *7.1.1 Mørk og yvirskipað stýring*

Upprunaliga ætlanin við umskipanini av miðfyrisitingini var, at Løgmansskrivstovan skuldi hava ein yvirskipaðan leiklut og virka tvørgangandi í mun til hini ráðini.

Vit halda ikki, at Løgmansskrivstovan virkar sum samskipari í samlaðu umsitingini, ella at hon stýrir málum yvirskipað. Hetta er óheppið. Ofta kann vera trupult at finna markið millum ráðini, eisini í ítøkiligum málum. Til dømis eru vinnumál í trimum ráðum, og eingin hevur enn kunnað sagt greitt, hvar markið millum Fiskimálaráðið og Vinnumálaráðið gongur.

Løgmansskrivstovan hevur eina uttanlandsdeild, sum stendur fyri samskifti og avtalum við umheimin, eitt nú ES, men Fiskimálaráðið tekur sær einsamalt av øllum fiskivinnusamráðingum. Ráðini eiga í størri mun at samskipa fakliga kunnleikan fyri at fáa sum mest burtur úr samráðingum okkara við útheimin.

Arbeiðsgevarafelagið hevur lagt til merkis, at viðgerðin av ávísum málum gerst trupul ella nærum ógjørlig, tí tey annaðhvørt hoyra undir tvey ymisk ráð, ella ógreitt er, hvør umsitur tey. Ofta hava ráðini eisini ymisk áhugamál, og tað ger ikki støðuna betri. Vit mæla staðiliga til, at landsstýrið tekur neyðug stig til yvirskipaða samskipan og stýring av málum, sum fevna um fleiri ráð.

### *7.1.2 Smidligur og effektivur bygnaður*

Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur í ársfrágreiðingum sínum eftirlýst, at landsstýrið kemur við uppskotum um nýskapan og effektivisering av almennu fyrisitingini, og at stig verða tikin, sum beina burtur nógvu dupultfunktiónirnar í ráðunum. Men støðan tykist bara versna.

Tá umsitingin varð umskipað, vóru 6 aðalstýri. Nú eru 9 ráð. Økingin er 50 prosent í fimm ár. Ein tann størsti trupulleikin við at seta fleiri ráð á stovn er, at hjá tí almenna er sera trupult at venda aftur. Skal talið á ráðum skerjast, má landsstýrið taka illa umtóktar avgerðir, eitt nú avgerðir um at siga fólki upp. Av royndum sæst, at tað er nærum ógjørligt at siga fólki upp hjá tí almenna.

Hvørt ráð uppbyggir egnar deildir við vekslara, arkivering, fíggjarumsiting, KT og jura, men fleiri ráðini verða, fleiri verða dupultfunktiónirnar. Vit hava ilt við at góðtaka, at eitt nú landsstýrismannaábyrgdin verður brúkt sum grundgeving fyri at seta fleiri ráð á stovn.

Um eitt nýtt landsstýri av politiskum orsøkum vil skipa stýringina øðrvísi, má tað kunna gerast uttan at seta fleiri ráð á stovn.

Føroya Arbeiðsgevarafelag ynskir ikki at venda aftur til gamla bygnaðin, tí nýggi bygnaðurin hevur havt fyrimunir við sær. Men Arbeiðsgevarafelagið fer at mæla landsstýrinum til at endurskoða almenna bygnaðin. Landsstýrið eigur at kanna fleiri møguleikar, harímillum møguleikarnar fyri skipanum við tvørgangandi projektorganisatiónum og eini skipan, sum ger tað óneyðugt at seta nýggj ráð á stovn fyri hvønn landsstýrismann.

## 7.2 Avriksmetan og málstýring í almenna verkinum

Tað almenna eigur í størri mun at arbeiða við menningarætlanum í umsitingini og innan tænastuveiting. Her kann nógv gerast. Vit kunnu vísa á avriksmetan, málstýring, benchmarking v.m. Hetta eru uppgávur, sum Løgmansskrivstovan kundi tikið sær av. Løgmansskrivstovan kundi fingið hini ráðini við og kannað, hvussu umsitingin og tænastuveitingin virka. Eitt nú kundi produktiviteturin verið kannaður.

Danska Fíggjarmálaráðið hevur boðað frá, at produktiviteturin í donsku kommununum er fallin 10 prosent síðstu 10 árini. Ein slík kanning er líka viðkomandi í Føroyum sum í Danmark.

Ein onnur verkætlan kundi verið *benchmarking*. Benchmarking-greiningar eru neyvar samanberingar av ymiskum viðurskiftum hjá fyritøkum, sum líkjast, eitt nú samanberingar av útreiðslum til umsiting av eins stórum skúlum. Samanberingarnar kunnu skapa grundarlag fyri ábótum. Fyritøkurnar kunnu læra hvør av aðrari við í størri ella minni mun at hava felags atgongd til innsavnaðu upplýsingarnar.

Við benchmarking kann tað almenna kanna dygdina á almennu tænastunum. Minni dugnaligar fyrisitingar kunnu læra av teimum dugnaligaru. Upplagt er, at tað almenna nýtir benchmarking, tí í fleiri førum gera umsitingarnar sama arbeiðið. Leggjast kann til brots við at samanbera til dømis fíggjarlig lyklatøl.

Ein týdningarmikil fortreyt fyri at fáa fulla nyttu av benchmarking er, at opinleiki er um úrslitini, so øll síggja, hvar besta málsviðgerðin og tænastuveitingin eru.

**7.3 Nevndir og grunnar politisk óheft**

At hava eitt klárt og týðiligt skott millum vinnu og politikarar er sera týdningarmikið. Tá virkar vinnan best og fær mest burturúr borgarunum at frama.

Ongin ivi skal vera um, at best fyri grunnar og nevndir er, um tey sleppa at virka politiskt óheft. Hetta krevur, at politikararnir hava virðing fyri markinum millum nevndina/grunnin og politisku skipanina.

Mál, sum hava verið nógv frammi í seinastuni, eru valini av nevndarlimum í Framtaksgrunnin og vísindaligu siðseminevndina. Fyri at sleppa undan óneyðugum iva, um talan er um politiska uppílegging ella ikki, mæla vit til, at karmarnir verða broyttir, so landsstýrið fær eina fasta mannagongd, tá ið tað velur limir í nevndir.

Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur, at umsitingin skal tilmæla, hvørji fólk eru skikkað at sita í einari nevnd. Hon kann tilmæla fleiri valevni, enn landsstýrismaðurin skal tilnevna. Landssýrismaðurin setir so nevndina út frá teimum evnum, sum umsitingin hevur skotið upp. Almenningurin eigur, um hann krevur tað, at fáa innlit í, hvør er skotin upp, og hvør er valdur í nevndina. Um ein tilnevndur persónur ber seg undan, skal landsstýrismaðurin aftur venda sær til umsitingina og fáa nýtt tilmæli frá henni. Ein tílík mannagongd hevði tryggjað, at nevndirlimir vórðu valdir eftir fakligum førleika.

**7.4 Alment innkeyp – skipan**

Í føroyska samfelagsbúskapinum er almenni parturin lutfalsliga stórur, og tí má tað almenna rekast effektivt.

Eitt øki, sum kann verða skipað betur, er almenna innkeypið. Ein máti at skipa tað betur er at áseta, at øll innkeyp oman fyri ávísa upphædd, til dømis 100.000 krónur, skulu skrásetast í einum innkeypsportali á alnótini. Henda skipan hevði tryggjað størri opinleika í almenna innkeypinum og økta kapping millum útbjóðararnar av vørum og tænastum til tað almenna. Økt kapping skuldi so aftur havt við sær betri prís og spardar skattakrónur. Við tílíkari skipan verða allir útbjóðarar javnsettir. Ein óbeinleiðis avleiðing verður eisini menning av kunningartøknini.

**7.5 Menning av KT-økinum**

Varð størri orka løgd í at menna digitaliseringina av almenna sektorinum, kundi samfelagið rokkið fleiri málum samstundis:

- vit høvdu nútímansgjørt almenna sektorin og effektiviserað raksturin
- borgarar í øllum landinum høvdu fingið lættari atgongd til almennar tænastur
- við luttøku í slíkum verkætlanum hevði føroysk KT-vinna sum frá leið kunnað ment seg til útflutningsvinnu

Arbeiðsgevarafelagið heldur, at tað almenna eigur at ganga undan á KT-økinum. Sum fyrsta stig má øll kunning hjá almennu stovnunum, umsóknir og annað, leggjast á netið.

Hugt eigur eisini at verða at størri verkætlanum innan størri øki, har fyrimunirnir við tí lítla og opna samfelagnum verða brúktir til at menna skipanir, sum størri samfeløg illa fáa gjørt. Soleiðis kundu ítøkiligar verkætlanir komið burtur úr KT-politikkinum hjá Vinnumálaráðnum.

**7.6 Kommunurnar og vinnan**

Í dag hava kommunurnar avmarkaðar uppgávur í mun til vinnuna. Vinnan hevur í størri mun samskifti við landsumsitingina og stovnar hennara. Verða kommunalu eindirnar størri, er hugsandi, at kommunurnar og vinnan fara at samskifta meira sínámillum.

Sambært kommunulógini kann ein kommuna bara taka lut í vinnuligum virksemi, um virksemið tænir einum almannagagnligum endamáli og ikki hevur vinning fyri eyga. Kommunan kann seta almenn tiltøk í verk, um tey eru til frama fyri vinnulívið á staðnum, men stuðul til einstaklingar ella einstakt virksemi má ikki latast uttan undir serligum umstøðum.

Vinnan vil, at kommunurnar skapa henni góðar karmar at virka undir, og at karmarnir eru støðugir. Kommunurnar eiga at gera langtíðarætlanir, sum fevna um minst 5 ár og vísa, hvat kommunurnar vilja.

Karmarnir í teimum einstøku kommununum eru ymiskir. Niðanfyri skal verða nortið við skatt, íløgur og barnaansing.

*7.6.1 Skattur*

Kommunurnar ávirka vinnulívið bæði við skatting av fyritøkum og við skattinum, sum starvsfólkini hjá virkjunum gjalda. Er skattatrýstið ov høgt, tíma starvsfólkini ikki at arbeiða.

Sum tað sæst á talvuni niðanfyri, var skattatrýstið hjá kommununum um 14 prosent í áttatiárunum. Nú er tað 19 prosent. Tað hækkaði munandi undir kreppuni, men er ikki lækkað aftur í sama mun. Hinvegin eru lønargjaldingarnar vaksnar munandi. Tær eru størri enn í 1989, og kommunurnar fáa meira inn í dag, enn tær nakrantíð fingu í áttatiárunum. Vinnan er ímóti óneyðuga høgum skattatrýsti. Høgt skattatrýst økir um útreiðslurnar hjá vinnuni beinleiðis og óbeinleiðis og skaðar kappingarførið.




Broytingar í mun til støði í 1988




Sum tað sæst á seinnu myndini, eru netto rentuútreiðslurnar hjá kommununum lækkaðar munandi, meðan rakstrarútreiðslurnar eru hækkaðar í sama mun. Her er neyðugt, at kommunurnar tálma rakstrarútreiðslunum, eitt nú við at rationalisera raksturin. Ein máti kundi verið størri eindir. Tá høvdu kommunurnar fingið stórrakstrarfyrimunir.

*7.6.2 Kommunal tænasta – barnaansing*

Kommunurnar hava yvirtikið barnaansingina frá landinum. Við yvirtøkuni fór fram ein fíggjarlig uppgerð millum land og kommunur. Nógvar kommunur hava útbygt barnaansingarøkið. Hetta er positivt fyri vinnuna, men tørvurin er ikki nøktaður. Tá vinnuni vantar arbeiðsmegi, er sera týdningarmikið, at børnini verða ansað, so fólk sleppa til arbeiðis. Vantandi barnaansing skapar í dag trongar í fleiri kommunum.

Kommunurnar eiga eisini at hugsa øðrvísi. Hvat við at bjóða barnaansingina út í kapping? Kommunan kann seta karmarnar, meðan privat loysa uppgávuna. Útbjóðing av uppgávum í kapping er ein effektivur máti at menna bæði produktivitet og dygd, sí part um útbjóðing av almennum uppgávur.

*7.6.3 Íløgur*

Vanligastu íløgurnar hjá kommununum hava verið íløgur í havnarløg, men her hava kommunurnar gjørt ov nógv av. Íløgurnar áttu at verið samskipaðar soleiðis, at nakrar kommunur gjørdu íløgur í havnarløg, meðan aðrar satsaðu upp á onnur øki. Samfelagsbúskaparliga er tað ikki rationelt, at nógvar kommunur gera somu íløgu.

Sum heild eiga kommunurnar í nógv størri mun at samstarva og samskipa íløgurnar. Vinnan vil hava góðan infrastruktur, men hann má útbyggjast við skili. Eisini fer vinnan at mæla kommununum til at gera íløgurnar, tá vinnuni ikki gongst so væl. Soleiðis kunnu kommunurnar eisini virka sum ein stabiliserandi faktor í samfelagnum.

Landsstýrið hevur í ein ávísan mun valt at stýra íløgunum hjá kommununum. Vinnan heldur, at hetta er neyðugt fyri at regulera virksemið í landinum.

*7.6.4 Interkommunalir stovnar*

Sera umráðandi er, at interkommunalir stovnar virka á sunnum grundarlag. Interkommunalir stovnar kunnu hava einkarrætt á teirra øki, og tí er týdningarmikið, at rímiligt lutfall er millum kostnað og tænastuveiting, og at tænastuveitingin verður mett í mun til somu veitingar aðrastaðni. Einkarrættur kann ofta hava við sær, at virkið, sum einkarrættin hevur, tekur ov nógvan pening fyri tænastuveitingina, tí ongin kapping er um hana.

Kommunurnar mugu seta interkommunalu stovnunum krøv viðvíkjandi góðsku og prísi. Interkommunalir stovnar kunnu avlaga kappingarviðurskiftini hjá vinnuni, um hon ikki fær somu kor at virka undir sum vinnnan í londunum kring okkum.

*7.6.5 Arbeiðsmarknaðurin – sáttmálar*

Við yvirtøku av málsøkjum er uppgávan hjá kommununum sum arbeiðsgevari vorðin størri. Komunal arbeiðsgevarafeløg eru sett á stovn. Neyðugt er hjá kommunalu og privatu arbeiðsgevarunum at samstarva, serliga um lønarstøðið. Gjørdar avtalur á kommunala økinum ávirka privata arbeiðsmarknaðin og øvugt. Arbeiðsgevarafelagið mælir tí til, at privatu og almennu arbeiðsgevararnir hittast regluliga og viðgera sáttmálar og lønarkarmar.

**7.7 Privatisering**

Í dag hevur Føroya Landsstýri fýra milliardir krónur bundnar í almennum fyritøkum. Stórt spurnartekn kann setast við skynsemið í hesum. Vórðu hesar fýra milliardirnar brúktar til at niðurgjalda skuld í staðin, kundi landsstýrið spart stórar upphæddir í rentuútreiðslum. Henda sparing kundi so latið upp fyri fleiri íløgum og betri tænastum til borgararnar. Týdningarmesta grundin til at privatisera almennu partafeløgini er tó, at váðin spjaðist munandi meira.

Løgmansskrivstovan læt herfyri úr hondum frágreiðing um at einskilja fyritøkur landsins. Sum heild tekur Føroya Arbeiðsgevarafelag undir við niðurstøðunum í frágreiðingini og mælir landsstýrinum til at fylgja tilmælunum. Frágreiðingin vísir eisini á trupulleikar við, at tað almenna rekur vinnuvirkir. Sagt verður, at landið eigur fyritøkur, sum virka í kappingarumhvørvi. Síðan stendur:

*»Privatu fyritøkurnar, kappast verður við, kenna kappingartrýstið frá almennu fyritøkunum sum kappingaravlagandi og órímiligt. Hinvegin kenna almennu fyritøkurnar tíðum eigaraviðurskiftini sum avmarkandi fyri møguleikar teirra*

*at klára seg í kappingini. Hesi sjónarmið hjá einskildu og almennu fyritøkum eru í andsøgn hvørt við annað, men geva tó greiða ábending um, at óheppin vinnupolitisk viðurskifti gera seg galdandi«*[1]

Landið eigur nógvar fyritøkur antin beinleiðis ella óbeinleiðis gjøgnum grunnar og feløg. Hetta samsvarar ikki við vinnupolitikkin. Í vinnupolitikkinum verður víst á, at altjóða rákið heilt greitt ber ímóti minni almennari stýring og fríari kapping. Tað almenna skal tryggja vinnunum ávísar støðugar karmar við virðing fyri trivnaði og umhvørvi. Vinnuligu karmarnir verða støðugt raðfestir, so vinnan fær rúm, ræsur og frið at virka undir marknaðarbúskaparligum treytum.

Sum áður víst á í hesum bóklingi, er fíggjarliga undirstøðukervið í Føroyum undirment. Somu niðurstøðu kemur frágreiðingin um at einskilja fyritøkur landsins til. Betri atgongd til kapital verður tryggjað við vælvirkandi og vælskipaðum marknaðarstaði fyri parta- og lánsbrøv, sum føroyskar fyritøkur lætt kunnu sleppa framat. Tørvurin á føroyskum eins væl og útlendskum íleggjarum verður nøktaður við tílíkum marknaðarstaði. Skal áhugin hjá íløgukapitalinum fyri at leita inn í føroyskt vinnulív vekjast og mennast, er neyðugt, at útboðið av føroyskum partabrøvum er áhugavert. Við at einskilja almennu fyritøkurnar kann tað almenna virka fyri at menna undirstøðukervið og vekja áhugan.

Føroya Arbeiðsgevarafelag mælir til, at tað almenna so líðandi privatiserar almennu fyritøkurnar soleiðis, at tær fara at virka undir vanligum treytum á privata marknaðinum til gagns fyri føroyska samfelagið.

**7.8 Útbjóðing**

Endamálið við útbjóðing av almennum uppgávum er umvegis kapping at fáa størri effektivitet í tann almenna sektorin og tryggja, at almennir pengar og tilfeingi verða gagnnýtt á best møguligan hátt.

[1]Frágreiðing um at einskilja fyritøkur landsins, s. 7

Uppgávurnar hjá tí almenna kunnu býtast í myndugleikauppgávur og tænastuveitningar, og skiljast kann millum kjarnuveitingar og hjálpifunktiónir. Tað mest nærliggjandi í fyrsta umfari er at bjóða út tænastuveitingar og serliga hjálpifunktiónir.

Vanligt er í øðrum londum at bjóða út uppgávur sum reingerð, rakstur av kantinum, vaktartænastu, viðlíkahald av bygningum, KT-tænastur og rakstur, koyring og verkstaðararbeiði. Aðrar uppgávur sum ráðgevingarvirksemi, skeiðvirksemi og barnaansing kunnu eisini verða bodnar út.

Í Føroyum hava útbjóðingar ikki rættiliga vunnið frama. Ávís økir eru boðin út, eitt nú busskoyring og innsavning av ruski í Tórshavnar kommunu, men neyðugt er at leggja størri dent á útbjóðingar.

Kanningar í Danmark vísa, at útbjóðingar í flestu førum hava við sær sparingar úr 10 prosentum upp í 29 prosent í einstøkum førum. Tað vísir seg eisini, at ongin andsøgn er í tí at hækka tænastustøðið og at spara. Í 64 prosentum av førunum eru staðfestar bæði sparingar og hækkað tænastustøði. Kommunurnar uppliva, at tær fáa ta dygd, tær rinda fyri. Útbjóðingarnar gera eisini, at kommunurnar leggja størri dent á at skipa arbeiðini, stýra tilfeinginum og menna dygdina.

Fyri at seta ferð á útbjóðingarnar av almennum uppgávum eigur landsstýrið at orða ein politikk á økinum og leggja eina ætlan um, hvussu útbjóðingar kunnu fremjast í verki. Ásett eigur at verða, at uppgávur, sum kunnu loysast av øðrum enn tí almenna, regluliga skulu bjóðast út.

Landsumsitingin kundi veitt kommununum ráðgeving í, hvussu útbjóðingar kunnu setast í verk. Somuleiðis eiga tær royndir, sum hóast alt eru fingnar til vega í Føroyum í sambandi við útbjóðingar, at verða savnaðar saman.

Vísast kann á, at danir hava sett á stovn eitt útbjóðingarráð, sum skal geva góð ráð um útbjóðing av almennum rakstrar- og anleggsuppgávum. Tað skal eisini vísa á, hvørjar uppgávur eru egnaðar til útbjóðing. Tað almenna skal ikki seta fleiri fólk at gera hetta. Heldur eigur at verða raðfest øðrvísi í umsitingini.

At bjóða uppgávur út, sum tað almenna hevur røkt, er uttan iva ein trupul uppgáva, ikki minst tí tað ávirkar starvsfólkaviðurskiftir. Men útbjóðingarleiðin má gangast fyri at tryggja, at almennir pengar og tilfeingi verða gagnnýtt á bestan hátt.

# 8 Nøkur tilmæli um lógarbroytingar/-endurskoðan

Nøkur ítøkilig tilmæli um, hvussu lógararbeiðið kann gerast betri, og hvørjar lógarbroytingar eiga at verða framdar á vinnuøkinum.

**8.1 Reglur fyri lógararbeiði og hoyringar**

Eitt nútíðarsamfelag hevur brúk fyri lógum og reglum. Lógir og reglur eru grundarlagið undir vælferðarsamfelagnum. Tær verja tey veikastu í samfelagnum, umhvørvið og so mangt annað. Men lógir og reglur kunnu eisini vera ein kleppur um beinini á borgarunum. Lógir, sum eru illa úr hondum greiddar og byrokratiskar, skerja initiativið hjá tí einstaka og skaða kappingarevnini hjá fyritøkunum. Eisini eru vánaligar lógir og reglur dýrar at umsita.

Føroya Arbeiðsgevarafelag mælir til at broyta mannagongdirnar í sambandi við lógarsmíð. Myndugleikarnir mugu taka hetta arbeiðið í størri álvara. Hvørt ár síggja vit, beint áðrenn tingmanningin fer í summarfrí, at illa gjørdar lógir verða skrumblaðar í gjøgnum tingið. Hetta kann ikki vera rætt.

Tá lógir og kunngerðir skulu orðast, eiga myndugleikarnir fyrst og fremst at seta sær spurningin, um regulering yvirhøvur er neyðug, og um vit vilja bera kostnaðin av henni. Vit skulu ikki gera lógir og reglur, tá tað er óneyðugt, tí sum pinkusamfelag hava vit ikki orku til at umsita eitt veldugt lógartyssi. Jú færri lógir, jú lættari fyri borgaran, og bíligari verður umsitingin.

Er neyðugt við reguleringum, má kunna verða kravt, at lógirnar verða betri. Eitt nú eiga allir partar, sum lógirnar fevna um, at verða við í arbeiðnum. Partarnir skulu vera við í arbeiðnum beinanvegin, so avgerandi og grundleggjandi spurningar verða viðgjørdir, áðrenn lidnar loysnir verða festar á blað. Ov seint er at senda avvarðandi pørtum lógir og kunngerðir til ummælis, tá tær liggja á borðinum. Tá skulu partarnir taka støðu til meira ella minni lidnar loysnir, og kjakið verður trongt og trupult.

Ein tílík mannagongd setir størri krøv til lógarsmíðið, sum verður drúgvari. Men Føroya Arbeiðsgevarafelag er sannført um, at økta arbeiðsorkan fæst fleiri ferðir aftur í hinum endanum, tí færri villur verða í lógarsmíðnum, og lógirnar hava nógv færri óhepnar avleiðingar við sær. Gott lógarsmíð sleppur samfelagnum undan nógvum arbeiðsstríði.

Umframt at broyta mannagongdirnar í sambandi við lógarsmíðið mugu myndugleikarnar eftirmeta, um samtyktar lógir og kunngerðir virka eftir ætlan. Hetta má gerast, so lógirnar ikki bara hópa seg upp uttan mál og mið.

**8.2 Roknskaparlóg og partafelagslógin**

Skjótt eru 10 ár liðin, síðan føroyingar settu í gildi nýggja roknskaparlóg og nýggja partafelagslóg. Síðan tá er einki hent, hóast grannalondini stundum broyta sínar lógir.

Føroya Arbeiðsgevarafelag mælir til, at ein fakligur bólkur verður settur at kanna, um neyðugt er at broyja lógirnar. Eftir okkara tykki er tað týdningarmikið, at partafelagslógin og roknskaparlógin eru dagførdar og svara til lógarstandardin í londunum kring okkum. Vit hava fyrr sæð óhepnar avleiðingar av, at henda lóggávan var afturúrsigld. Føroyar eru partur av globaliseringini, sum hevur við sær øktan samhandil og íløgur tvørtur um landamørk. Tí má okkara vinnulóggáva vera á sama støði sum hjá øðrum londum.

Arbeiðsgevarafelagið mælir til, at færri enn 10 ár ganga, áðrenn neyðugu broytingarnar verða framdar, og at ein bólkur við jøvnum millumbilum endur-

skoðar lógirnar, so tær alla tíðina eru tíðarhóskandi og svara til menningina í samfelagnum.

**8.3 Endurskoðan av lógini um afturlatingartíðir**
Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur biðið Vinnumálaráðið seta ein arbeiðsbólk at endurskoða løgtingslóg um afturlatingartíðir nr. 56 frá 8. mai 1991.

Staðfestast kann, at grannalond okkara hava nógv liberalari afturlatingartíðir enn vit. Lógin um afturlatingartíðir er á øllum økjum strangari enn samsvarandi lógir í til dømis Danmark og Íslandi. Staðfestast kann eisini, at alt fleiri kioskir og líknandi handlar, sum hava opið langt út á kvøldið, selja mestsum allar vørur, eisini vørur, sum lógin ikki loyvir.

Í flestu heimum arbeiða maður og kona fullan dag. Fyri arbeiðstíð skulu børnini á stovn, og eftir arbeiðstíð skulu børnini heintast. Tá so er statt, eru stundirnar at fara til handils um dagin ikki góðar.

Í grannalondunum hava myndugleikarnir langt síðan skilt, at vanligi brúkarin vil sleppa til handils til dømis leygardag seinnapart, tá øll familjan hevur frí. Handilsfyritøkurnar upplýsa, at umsetningurin er stórur hesar dagar, og nakrar hava biðið Arbeiðsgevarafelagið tikið málið upp.

Vinnumálaráðið setti ein bólk við umboðum fyri arbeiðsgevarar og fakfeløg at endurskoða afturlatingarlógina. Bólkurin hevur arbeitt við eini skitsu um afturlatingartíðir. Undir arbeiðnum komu fakfeløgini við kravi um ávísar sáttmálabroytingar, áðrenn ein meira liberal afturlatingarlóg kann setast í gildi. Føroya Arbeiðsgevarafelag tekur ikki undir við hesum.

Arbeiðsgevarafelagið heldur, at hetta er skeiv leið at ganga. Lógarsmíð og sáttmálar á arbeiðsmarknaðinum skulu ikki samantvinnast. Landsstýrismaðurin í vinnumálum eigur at kunna leggja eitt lógaruppskot fram, sum tænir áhugamálunum hjá brúkarunum, hóast tað gongur ímóti áhugamálinum hjá einum yrkisbólki.

Arbeiðsgevarafelagið mælir landsstýrismanninum til at leggja lógarbroytingar fyri tingið til frama fyri borgaran, um so broytingarnar ganga ímóti áhugamálunum hjá einstøkum fakfeløgum. Letur hetta seg ikki gera, eigur galdandi lóg at verða hildin, og ruddast má upp í vøruúrvalinum hjá ávísum sølustøðum um kvøldarnar. Verandi støða er kappingaravlagandi í mun til stóru handlarnar, sum ikki sleppa at hava opið um kvøldarnar.

**8.4 Skráseting av persónsupplýsingum**
Tann 1. januar 2002 kom løgtingslóg nr. 73 frá 8. mai 2001 um viðgerð av persónsupplýsingum í gildi.

Endamálið við lógini er, sum skrivað stendur í 1. kapitli, at »*...tryggja persónsvernd hins einstaka, tá persónsupplýsingar verða viðgjørdir, soleiðis at persónsupplýsingar verða viðgjørdar við virðing fyri tí persónliga frælsinum og heimafriðinum.*«

Lógaruppskotið var til umrøðu hjá ymiskum áhugaðum, eitt nú Elektron, sum helt lógina vera skilagóða og týdningarmikla, tá havdar verða í huga allar upplýsingarnar um einstaklingar, sum tað almenna og vinnan skráseta í nútíðarsamfelagnum.

Eftir at løgtingið hevur viðgjørt og samtykt lógina, og eftir at landsstýrismaðurin við lógarmálum hevur gjørt kunngerð, er lógin ikki longur bara ein persónsverndarlóg, men er eisini ein vinnuverndarlóg, sum forðar fyri samstarvi millum føroyskar KT-fyritøkur og líknandi fyritøkur uttanlands. Serliga Elektron, sum røkir týdningarmiklar uppgávur fyri peningastovnarnar, merkir sviðan av hesum.

Tað er ein hóttan ímóti rættartrygdini, tá løgtingið setir lógir í verk, sum skerja virksemið hjá ávísum fyritøkum ella skipanum. Í hesum føri kann tað, hóast tað neyvan var ætlanin, skerja møguleikarnar hjá føroysku KT-vinnuni í framtíðini.

# 9 Føroyar og umheimurin

Viðurskifti okkara við umheimin verða viðgjørd, serliga tilknýtið til ES.

**9.1 Karmar um innflyting**

Fólk uttan fyri norðurlond kunnu ikki frítt koma til Føroya at arbeiða. Vanliga mannagongdin er, at tey skulu útfylla drúgva umsókn og senda danska útlendingastýrinum hana saman við passinum umvegis sendistovuna í landinum. Heimildina at taka avgerð um arbeiðs- og uppihaldsloyvi í Føroyum hevur Útlendingastýrið, og avgreiðslutíðin er ofta long.

Verandi mannagongd er ikki nøktandi, tá tørvur er á arbeiðsmegi. Innflyting av arbeiðsmegi basir mangan trupulleikum við trongum, og tað hevur stóran týdning.

Oljuvinnan hevur ofta havt brúk fyri fólki í eini handavend. Her eru Føroya Landfúti og Útlendingastýrið komin ásamt um munandi liðiligari mannagongd. Fyri *offshore industry* skulu umsóknir um arbeiðs- og uppihaldsloyvi sendast løgregluni. Løgreglan sendir síðan landsstýrinum avrit av umsóknini. Landsstýrið ummælir umsóknina og sendir løgregluni hana aftur, sum so faksar Útlendingastýrinum hana. Stýrið avger so, um arbeiðs- og uppihaldsloyvið skal latast. Er svarið játtandi, sleppur løgreglan í Føroyum at útskriva loyvið.

Henda mannagongd eigur ikki bara at vera galdandi fyri oljuvinnuna, men fyri allar vinnur í Føroyum. Øll virkir eiga at kunna fáa arbeiðsmegi úr útlondum, tá tørvurin ikki kann nøktast á heimamarknaðinum.

**9.2 Føroyar og ES**

Í tíðarskeiðinum 1994-1998 vóru viðurskifti okkara við ES mangan umrødd, og tvey umfatandi álit um støðu Føroya í mun til ES vórðu skrivað. Síðan er einki hent, og alt kjak er tagnað.

Vit fingu í 1992 eina handilsavtalu við ES, sum er høvuðsmarknaður okkara. Hon er síðan broytt, so nógv tann størsti parturin av útflutningi okkara er tollfríur. Nakrar vørur eru enn tarnaðar av tolli og framleiðslulofti. Eftir at vit í 2001 eisini fingu eina heilsufrøðiliga avtalu við ES, eru flestu av praktisku útflutningstrupulleikunum loystir.

Skulu vit gera støðuna upp, kann staðfestast:

*1. Føroyar gerast alt meira fjarar og týdningarleysar í mun til Evropa:*

- Royndirnar higartil hava víst, at tað er trupult og tíðarkrevjandi at broyta viðurskiftini við ES nevnivert. Vit eru einasta land, sum ikki enn er partur av felags evropeisku kummuleringsskipanini. Hetta hevur við sær, at vit orsakað av tollmúrum ikki kunnu innflyta ráðvøru úr øðrum londum til virkingar í Føroyum og selja hana í ES.
- Seinast hevur dumpingmálið víst, at ein handilssáttmáli kann hava avmarkað virði. Tá á stendur, eru vit bara eitt vanligt triðjaland í sama bási sum eitt nú Kili.
- Eisini kann staðfestast, at vit eru ikki partur av samansjóðingina í Evropa. Øll londini um okkara leiðir eru partur av innara marknaðinum hjá ES, og skjótt verður hesin marknaður víðkaður til eisini at umfata eystanlondini. Ásannast má, at tað, at onki verður gjørt viðvíkjandi okkara viðurskiftum við ES, er ein óheppin avgerð, fyrst og fremst tí vit harvið ikki gerast greið yvir avleiðingarnar.

*2. Samstundis noyðast vit í øllum at laga okkum eftir ES standardum:*

- Royndirnar eru, at vit í nógvum viðurskiftum noyðast at laga lógir og reglur eftir ES-reglum. ES setir standardin í okkara heimsparti, og vilja vit hava samhandil við ES, mugu reglurnar fylgjast.

*3. ES og pinkusamfeløg:*

- ES er ein sera miðsavnað eind, og skrivstovuveldið er ógvusligt. Hetta kann geva einari pinkutjóð sum Føroyum trupulleikar, um vit skulu uppfylla somu krøv sum stóru londini í Evropa.

Í Íslandi og Noreg er kjakið um ES-limaskap av álvara kyknað uppaftur. Í báðum londunum mæla nøkur av stóru vinnufeløgunum til limaskap. So avgjørt er Føroya Arbeiðsgevarafelag ikki, men vit mæla staðiliga til, at kjakið verður tikið uppaftur. Eftir okkara tykki eiga vit at royna at fáa eitt tætt tilknýti til ES. Tó skal fyrilit takast fyri seráhugamálum sum fiskivinnuni og tí veruleika, at ovurhonds stóra skrivstovuveldið í ES tykist hóska illa til pinkulandið Føroyar.

Um greiður politiskur meiriluti er fyri at vera uttan fyri ES ella EBS, eiga vit at gagnnýta hesa støðu. Vit kundu møguliga skipað karmar fyri nýggjum vinnum.

# 10 Vinnusjónarmið í stuttum

**2 Samfelagsbúskapur og stýring**

*2.1. Óheft útlendskt búskapareftirlit*

Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur tað vera sera týdningarmikið, at Føroyar eins og onnur lond fáa altjóða stovnar at meta um búskapin.

*2.2. Samfelagskjak – betri samskifti, so nakað kemur burturúr*

Samskifti eigur at vera millum allar partar, bæði politikarar, embætisfólk, vinnuna og fjølmiðlarnar. Serliga Búskaparráðið eigur at samskipa hetta samskiftið. Høvuðsuppgávan hjá Búskaparráðnum má vera at leggja lunnar undir kjakið við lættfatiligum greiningum og ikki við ítøkiligum uppskotum um, hvussu tilráðingar hjá ráðnum skulu fremjast í verki.

**3 Vinnukarmar**

*3.1 Javna kapping – ikki protektionismu*

Føroya Arbeiðsgevarafelag vil ikki hava vinnuna lagda í kuvøsu. Kapping er altíð góð, men hon skal vera á jøvum føti. Sum meginreglu vil Føroya Arbeiðsgevarafelag ikki skerja kappingina ella seta upp verjumúrar um føroyska vinnulívið. Onki gagn er í at verja føroyska vinnu mótvegis millum annað útlendskari kapping og útlendskum kapitali.

*3.2 Støðumeting av vinnupolitikkinum*

Nøkur ár eru liðin, síðan vinnupolitikkurin varð viðgjørdur á tingi. Føroya Arbeiðsgevarafelag mælir til, at ein støðumeting verður gjørd.

*3.3 Politisk stýring av vinnulívinum*

At veita vinnuni stuðul er tað sama sum at leggja seg út í fría marknaðin. Tað er ein roynd hjá politikarunum at stýra vinnuni. Kreppan vísti, at best er at lata marknaðarkreftirnar ráða. Hetta eiga politikararnir at leggja sær í geyma.

*3.4.1 Flakavinnan og bindingar í fiskivinnuni*

Arbeiðsgevarafelagið mælir til, at føroysk virkir eins og virkir í ES, sum keypa fisk úr Føroyum, skulu kunna keypa støddar- og góðskuskildan fisk.

*3.4.2 Rakstarstuðul til flutning av fiski*

Arbeiðsgevarafelagið mælir til, at hugt verður nærri at hesum viðurskiftum, og at róð verður aftur á beint.

*3.5 Fíggjarligt undirstøðukervi*

Miðast skal eftir at fáa virðisbrævamarknaðin at virka á sunnum búskaparligum grundarlag.

*3.6.1 Førleikamenning og oljupengar*

Tørvur er á samskipan millum vinnuna, Oljumálaráðið og oljuvinnufeløgini í sambandi við tær 85 milliónirnar, sum oljufeløgini hava bundið seg at brúka upp á førleikamenning í Føroyum.

**4 Arbeiðsmarknaðurin**

*4.1 Tillaging av kørmunum um arbeiðsmarknaðin*

Føroya Arbeiðsgevarafelag mælir til, at ferð verður sett á fyrireikingarnar at stovna føroyskan arbeiðsrætt. Lóg um seming í arbeiðsósemjun eigur eisini at verða broytt og dagførd. Neyðugt er við eini semingslóg, sum fevnir um allan arbeiðsmarknaðin.

*4.2 Forðingar fyri atgongd til arbeiðsmarknaðin*

Føroya Arbeiðsgevarafelag mælir staðiliga til, at myndugleikarnar taka forðingar fyri atgongd til arbeiðsmarknaðin í álvara. Karmar, sum bøtast má um beinanvegin, eru barnaansingin, eldraøkið og íbúðarviðurskiftini.

*4.3.1 Innanhýsis skipanir á virkinum*

Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur, at virkisleiðslur eiga at geva heilsu, trygd og umhvørvi (HTU) meira gætur. Skipanir, ið fevna um HTU-viðurskiftir, eru ein natúrlig víðkan av góðskuhugsunarháttinum.

*4.3.2 Umhvørvisverndarlógin og umhvørviskrøv*

Føroya Arbeiðsgevarafelag mælir til, at avvarðandi myndugleikar viðgera umhvørviskrøv saman við vinnufeløgum, og at eitt umhvørvisráð verður sett á stovn, sum er mannað við pørtunum á arbeiðsmarknaðinum eins og Arbeiðs-umhvørvisráðið. Somuleiðis mælir felagið til, at skipanin við umhvørvisgóð-kenningum av virkjum verður broytt soleiðis, at felags umhvørviskrøv verða ásett fyri vinnugreinir og ikki sum nú fyri hvørt virki sær.

*4.4 Tillagingar av ALS skipanini*

Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur, at áðrenn útgjaldið verður hækkað, eigur at verða róð aftur á beint í mun til upprunaligu skipanina. Neyðugt er at seta inn-gjaldsloftið innaftur í skipanina, og útgjaldstíðarskeiðið eigur at verða stytt.

*4.5 Arbeiðsmarknaðarlógir*

Føroya Arbeiðsgevarafelag mælir frá, at danskar lógir og ES-arbeiðsmarknað-arlógir fara at mynda okkara arbeiðsmarknað. Partarnir á arbeiðsmarknaðinum eiga sjálvir at greiða viðurskiftini sínámillum.

*4.6. Eftirlønarskipan*

Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur, at tað almenna ikki eigur at gera eina ser-staka eftirlønarskipan, men heldur byggja á tær skipanir, sum longu eru innan allar lønarsáttmálar á føroyska arbeiðsmarknaðinum. Leikluturin hjá tí al-menna er at skapa karmar. Tað skal seta neyðug krøv og eftir teimum góðkenna verandi skipanir ella krevja tillagingar í teimum.

**5 Vinnan, útbúgvingarøkið og gransking**

Føroyingar eiga í størri mun at leggja dent á at menna útbúgvingarøkið og granskingina. Alt útbúgvingarverkið eigur at verða eftirkannað, og neyðugar bygnaðarbroytingar mugu fremjast.

*5.1.1 Fólkaskúlin*

Føroya Arbeiðsgevarafelag mælir til at leggja størri dent á tað fakliga. Dygd-armenning og eftirmeting av góðsku í øllum liðum eigur eisini at vera fastur táttur í skúlanum. Vit halda eisini, at strangari krøv eiga at verða sett læraraút-búgvingini.

*5.1.2 Miðnámsskúlin*

Føroya Arbeiðsgevarafelag mælir til, at minni verður gjørt burturúr at bólka studentaskúlanæmingar í matematiska og málsliga deild. Eisini í miðnáms-skúlunum skal miðvís dygdarmenning setast í verk.

*5.2 Eftirútbúgvingar*

Arbeiðsgevarafelagið heldur, at einstøku útbúgvingarstovnarnir skulu gerast liðiligari. Eisini skulu teir leggja seg eftir at samstarva sínámillum og við vinnulívið.

*5.3 Fróðskaparsetrið – krøv til gransking og granskarar*

Eyðsæð er, at størri orka eigur at verða nýtt til gransking í Føroyum. Neyðugt er eisini at endurskoða leiðslubygnaðin á Fróðskaparsetrinum, so bygnaðurin gerst meira tíðarhóskandi.

*5.4 KT-útbúgvingar*

Umráðandi er at undirvísa í kunningartøkni og menna nýtsluna av tøknini.

*5.6 Skipan av almennum grunnum og játtanum til gransking og menning*

Ein felags umsiting í einum felags umhvørvi hevði verið ein gongd leið til tess at ment umsitingarnar av játtanunum.

*5.7 Framtíðar senario*

Stig eiga at verða tikin til at seta upp nøkur senario fyri føroyska samfelagið.

**6 Skattaskipanin**

*6.1 Skattalógin og bindandi avgerðir*

Eitt virki skal kunna fáa eitt bindandi svar frá Toll- og Skattstovu Føroya frammanundan um, hvussu ein avgerð ávirkar skattin hjá virkinum.

*6.2 Kappingarførið – persónsskattir*
Skattastigin má broytast. Neyðugt er at lækka skattaprosentið munandi á seinast vunnu krónunum. Samstundis má markið fyri, nær toppskattur verður goldin, setast munandi upp.

*6.3 MVG*
Stórt sæð øll undantøkini í mvg-lógni eiga at verða avtikin. Er fatanin, at borgararnir rinda ov nógv í meirvirðisgjaldi, tí tað umfatar øll øki, er altíð møguligt at lækka gjaldið.

*6.4 Punktgjøldini*
Føroya Arbeiðsgevarafelag mælir til, at punktavgjøldini verða tikin av øllum vørum.

*6.5 Møguleiki fyri inntøkujavning í skatti*
Arbeiðsgevarafelagið saman við Havbúnaðarfelagnum mælir til, at carry back reglur koma inn í føroysku skattalógina, og at tíðarbilið, har hall kann førast fram og dragast frá skattliga úrslitinum, verður longt upp í 10 ár.

*6.6 Skattalógin diskriminerar føroysk virki í oljuhøpi*
Arbeiðsgevarafelagið saman við Oljuvinnufelagnum mælir til at broyta lóggávuna, so ein útlendingur rindar tað sama í skatti, sama um hann arbeiðir hjá einum føroyskum felag ella einum útlendskum felag í Føroyum

**7 Almenni sektorurin**
*7.1.1 Mørk og yvirskipað stýring*
Arbeiðsgevarafelagið mælir til, at Løgmansskrivstovan leggur størri dent á at samskipa samlaðu umsitingina.

*7.1.2 Smidligur og effektivur bygnaður*
Arbeiðsgevarafelagið mælir til, at landsstýrið endurskoðar almenna bygnaðin.

*7.2 Avriksmentan og málstýring í almenna verkinum*
Tað almenna eigur í størri mun at arbeiða við menningarætlanum í umsitingini og innan tænastuveiting. Somuleiðis eigur umsitingin at brúka *benchmarking* til at kanna dygdina á almennu tænastunum.

*7.3 Nevndir og grunnar politiskt óheft*
Mælt verður til, at karmarnir verða broyttir, so landsstýrið fær eina fasta mannagongd, tá ið tað velur limir í nevndir.

*7.4 Alment innkeyp*
Almenna innkeypið eigur at verða skipað betur til dømis við at skráseta innkeyp í einum innkeypsportali.

*7.5 Menning av KT-økinum*
Arbeiðsgevarafelagið heldur, at tað almenna eigur at ganga undan á KT-økinum.

*7.6 Kommunurnar og vinnan*
Kommunurnar eiga at gera langtíðarætlanir, sum fevna um minst 5 ár.

*7.6.1 Skattur*
Kommunuskattatrýstið eigur ikki at vera óneyðuga høgt.

*7.6.2 Kommunal tænasta – barnaansing*
Kommunurnar eiga at hugsa øðrvísi og møguliga bjóða til dømis barnaansingina út í kapping

*7.6.3 Íløgur*
Sum heild eiga kommunurnar í nógv størri mun at samstarva og samskipa íløgurnar.

*7.6.4 Interkommunalir stovnar*
Kommunurnar mugu seta interkommunalu stovnunum krøv viðvíkjandi góðsku og prísi.

*7.6.5 Arbeiðsmarknaðurin – sáttmálar*
Neyðugt er hjá kommunalu og privatu arbeiðsgevarunum at samstarva, serliga um lønarstøðið.

*7.7 Privatisering*
Føroya Arbeiðsgevarafelag mælir til, at tað almenna so líðandi privatiserar almennu fyritøkurnar.

*7.8 Útbjóðing*
Neyðugt er at leggja størri dent á útbjóðingar. Fyri at seta ferð á útbjóðingarnar av almennum uppgávum eigur landsstýrið at orða ein politikk á økinum og leggja eina ætlan um, hvussu útbjóðingar kunnu fremjast í verki.

**8 Nøkur tilmæli um lógarbroytingar/-endurskoðan**
*8.1 Reglur fyri lógararbeiði og hoyringar*
Føroya Arbeiðsgevarafelag mælir til at broyta mannagongdirnar í sambandi við lógarsmíð. Myndugleikarnir mugu taka hetta arbeiðið í størri álvara.

*8.2 Roknskaparlóg og partafelagslógin*
Føroya Arbeiðsgevarafelag mælir til, at ein fakligur bólkur verður settur at kanna, um neyðugt er at broya lógirnar. Ein bólkur eigur við jøvnum millumbilum at endurskoða lógirnar, so tær alla tíðina eru tíðarhóskandi og svara til menningina í samfelagnum.

*8.3 Endurskoðan av lógini um afturlatingartíðir*
Arbeiðsgevarafelagið mælir landsstýrismanninum í vinnumálum til at leggja lógarbroytingar um liberalari afturlatingartíðir fyri tingið til frama fyri borgaran.

*8.4 Skráseting av persónsupplýsingum*
Tað er ein hóttan ímóti rættartrygdini, tá løgtingið setir lógir í verk, sum skerja virksemið hjá ávísum fyritøkum ella skipanum. Løgtingslógin um viðgerð av persónsupplýsingum er eitt dømi um hetta.

**9 Føroyar og umheimurin**
*9.1 Karmar um innflyting*
Fyri oljuvinnuna eru Føroya Landfúti og Útlendingastýrið komin ásamt um munandi liðiligari mannagongd, tá sókt verður um arbeiðs- og uppihaldsloyvi í Føroyum. Mannagongdin eigur ikki bara at vera galdandi fyri oljuvinnuna, men fyri allar vinnur í Føroyum.

*9.2 Føroyar og ES*
Føroya Arbeiðsgevarafelag mælir til, at kjakið um støðu okkara til ES verður tikið uppaftur. Um greiður politiskur meiriluti er fyri at vera uttan fyri ES ella EBS, eiga vit at gagnnýta hesa støðu. Vit kundu møguliga skipað karmar fyri nýggjum vinnum.

VINNUHÚSIÐ

*House of Industry*

FØROYA ARBEIÐSGEVARAFELAG